

# Dátueftirlitið

Ársfrágreiðing 2010

## INNIHALD


1. **Fororð** 5

2. **Dátueftirlitið, Ráðið og skrivstovan** 6
   2.1. Játtanin á løgtingsfíggjarlógini 6
   2.2. Lógargrundarlagið hjá Dátueftirlitinum 6
   2.3. Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum 7

3. **Virksemi í árinum 2010** 9
   3.1. Norðurlendskir fundir 10
   3.2. Tryggari internetdagur 10
   3.3. Bóklingur 12
   3.4. Eftirlit 13
   3.5. Hagtøl 13
   3.6. Munnligir fyrispurningar 15
   3.7. Loyvi og fráboðanir 17
      3.7.1. Loyvi til verkætlanir 17
      3.7.2. Verkætlan: Nøgdsemiskanning í Sjúkrahúsverkinum 17
      3.7.3. Verkætlan: “Screening af færøske 9. klasses elever for type 2 diabetes risiko” 18
      3.7.4. Verkætlan: Aðrar verkætlanir, sum ikki hava kravt loyvi frá Dátueftirlitinum 18
      3.7.5. Verkætlan: Ílegusavnið (6 fráboðaðar granskingarverkætlanir) 18
   3.8. Hoyringar 19
      3.8.1. Lógaruppskot 19
      3.8.2. Kunngerðir 19
      3.8.3. KT-politikkur 19
   3.9. Vegleiðingar 20

4. **Ávís útvald mál í 2010** 26
   4.1 Ymisk mál 26
      4.1.1. Innlit í logg í THS-skipanini 26
      4.1.2. Tollvaldið – atgongd til vakmyndatólsupptøkur 26
      4.1.3. P- tal prentast á heilsutrygdarkort 27
      4.1.4. Sms-boð 27
      4.1.5. Kæra um myndir frá Ole Ivars tiltakinum í høllini á Hálsi tann 2. februar 2010 28
      4.1.6. Lønarseðlar við telduposti 28
      4.1.7. Streama gudstænastur á internetinum 29
      4.1.8. Peningastovnar flyta til SDC 29
      4.1.9. Íslendskt felag kappast við PBS 29
      4.1.10. Manntal 30
      4.1.11. Upptøka av undirvísing í skúlatíð 30
      4.1.12. Elektroniskt ALS-kort 30
      4.1.13. Krypteraðir mailar 31
      4.1.14. Skráseting á FaroeDating 31
      4.1.15. Loyvi at upptaka øll kall á VHF kanal 16 34
      4.1.16. Ikki heimild at útvega persónstøl frá Gjaldstovuni uttan samtykki 34
      4.1.17. Fyrispurningur um handfaring av barnaverndarmáli 35
      4.1.18. Innanhýsis samskifti millum skúla og frítíðarskúla 36
      4.1.19. Landsgrannskoðanin ynskir atgongd til skipanir hjá Almannastovuni 37
      4.1.20. Privatpersónur ynskir upplýsingar strikaðar á heimasíuni www.logting.fo 38
   4.2. Mál tikin upp av egnum ávum 39
      4.2.1. Nýggja kt-skipanin hjá peningastovnunum 39

5. **Altjóða samstarv** 42
6. **Eftirlit í 2010** 44

0101010

# FORORÐ 2010

Við hesum letur Dátueftirlitið ársfrágreiðing sína fyri 2010 úr hondum. Ársfrágreiðing verður skrivað sbrt. § 37, nr. 8 í persónsupplýsingarlógini og er ætlað almenninginum.

Í ársfrágreiðingini er ein lýsing av virkseminum hjá Dátueftirlitinum í árinum 2010. Føroyar fingu tann 15. Juni 2010 eina triðjalandsgóðkenning frá ES í sambandi við flutning av persónupplýsingum tvørturum landamørk. Hetta merkir, at ES metir Føroyar vera eitt land, sum verjir grundleggjandi demokratisk rættindi í einum nútímans talgildum samfelag og sostatt eru eitt trygt land at flyta persónsupplýsingar til.

ES góðkenningin hevur við sær, at Føroyar koma á listan yvir trygg triðjalond. Frammanundan eru á hesum lista lond sum Ísland, Noreg og Sveits umframt ES-londini. Mett verður at góðkenningin kemur at hava stóran týdning fyri føroyska samfelagið, og fer at gera tað lættari hjá føroyskum fyritøkum, herundir peningastovnunum, at samskifta við útheimin. Somuleiðis fer góðkenningin at hava týdning fyri gransking og ætlanirnar at fáa útlendskar granskarar til Føroyar at granska, fyri møguleikan hjá føroyskum fyritøkum at marknaðarføra seg uttanlands og fyri ætlanirnar at bjóða Føroyar fram sum altjóða hosting-miðdepil.

Aftur í ár hevur eitt av fokusøkjunum hjá Dátueftirlitinum verið børn og ung á internetinum, og Dátueftirlitið hevur eins og undanfarna ár vitjað á fleiri miðnáms- og fólkaskúlum kring landið. Avtala er somuleiðis gjørd við fleiri skúlar um árliga vitjan av Dátueftirlitinum við skúlaársbyrjan.

Dátueftirlitið skipaði á fyrsta sinni fyri tiltakinum Tryggari internetdagur í Føroyum. Hetta er eitt altjóða tiltak, sum verður hildið í meira enn 65 londum kring heimin annan týsdag í februar. Endamálið við degnum er at varpa ljós á tryggari internetnýtslu við serligum denti á børn og ung, og ætlanin er at halda dagin á hvørjum ári í Føroyum. Í sambandi við Tryggari internetdagin var ein kanning gjørd av internetnýtsluni hjá føroysku fólkaskúlanæmingunum. Kanningin vísti, at børnini eru sera ung, tá tey hava vangamynd á netinum, og at tey brúka internetið rættiliga nógv.

Kanningin vísti, at tørvur er á tilfari til tey yngru børnini, og í tí sambandinum var bóklingurin Tað er tín avgerð 2 gjørdur. Bóklingurin er um børn og internet- og fartelefonnýtslu, og málbólkurin er tey 9-12 ára gomlu. Bóklingurin er gjørdur í samstarvi við Miðlaráðið, SSP og Føroya Tele. Eisini varð ein filmur um happing gjørdur í tilknýti til bóklingin.

Eftirlit er nú vorðið ein integreraður partur av arbeiðinum hjá Dátueftirlitinum, og í 2010 var Dátueftirlitið á eftirlitsvitjan hjá Norðoya- og Vágatunlinum og hjá Kiosk Activ.

Tórshavn, 4. apríl 2011

| | |
|---|---|
| Turið Debes Hentze | Ingunn Eiriksdóttir |
| *Forkvinna í Dáturáðnum* | *Stjóri í Dátueftirlitinum* |

# 2 Dátueftirlitið

Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarligur myndugleiki, sum er skipaður undir Innlendismálaráðnum. Dátueftirlitið hevur fíggjarligt tilknýti til Innlendismálaráðið, men er í virksemi sínum óheft av Innlendismálaráðnum.

Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarligur myndugleiki, sum er skipaður undir Innlendismálaráðnum. Dátueftirlitið hevur fíggjarligt tilknýti til Innlendismálaráðið, men er í virksemi sínum óheft av Innlendismálaráðnum.

Dátueftirlitið umsitur Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við Ll. nr. 24 frá 17. mai 2004. Lógin verður vanliga nevnd persónsupplýsingarlógin.

Dátueftirlitið er hægsti fyrisitingarligi myndugleiki í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum, og avgerðirnar hjá Dátueftirlitinum sambært lógini eru fyrisitingarliga endaligar.



Dátueftirlitið hevur virkað síðan 1. januar 2002, tá persónsupplýsingarlógin kom í gildi. Dátueftirlitið er skipað við Dáturáði, valt av landsstýriskvinnuni í innlendismálum, og skrivstovu. Limirnir í Dáturáðnum eru persónliga valdir, og formaðurin skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða valdir fyri fýra ár, og somuleiðis verða varalimir valdir fyri fýra ár.

**Limirnir í Dáturáðnum 2008-2012:**
Landsstýriskvinnan í innlendismálum valdi tann 1. november 2008 somu limir í Dáturáðið eitt valskeið afturat. Samstundis eru nýggir varalimir valdir.

**Í Dáturáðnum eru:**
Turið Debes Hentze, advokatur, forkvinna.
*Varalimur Aibritt á Plógv, løgfrøðingur.*
Bjarni Wilhelm, fíggjarleiðari.
*Varalimur Annika Sølvará, stjóri.*
Óli M. Hansen, løgfrøðingur.
*Varalimur Regin W. Dalsgaard, stjóri.*

Valskeiðið hjá Dáturáðnum er 4 ár og gongur út 1. november 2012.

**Skrivstovan:**
Stovnurin er skipaður við einum stjóra, einum løgfrøðingi og einum skrivara.

Dátueftirlitið heldur til í egnum skrivstovuhølum, bústaðurin er Reyngøta 33, Tinganes.

## 2.1. JÁTTANIN Á LØGTINGSFÍGGJARLÓGINI

Játtanin hjá Dátueftirlitinum á løgtingsfíggjarlógini í 2010 var: kr. 1.984.000,-

Omanfyri er ein útgreining av fíggjarjáttanini hjá Dátueftirlitinum fyri árini 2008-2010.

## 2.2. LÓGARGRUNDARLAGIÐ HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM

**Í 2009 vóru hesar reglur galdandi:**

- Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við Løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004, (Persónsupplýsingarlógin).
- Kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum, (Trygdarkunngerðin).
- Kunngerð nr. 33 frá 11. apríl 2005 um at flyta persónsupplýsingar av landinum uttan loyvi frá Dátueftirlitinum.
- Kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi.
- Kunngerð nr. 30 frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, sum broytt við kunngerð nr. 70 frá 2. juli 2007.
- Kunngerð nr. 31 frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, sum broytt við kunngerð nr. 71 frá 2. juli 2007.
- Kunngerð nr. 32 frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, sum broytt við kunngerð nr. 72 frá 2. juli 2007.
- Reglugerð fyri Dáturáðið, dagfest 14. juni 2007.
- Innanhýsis roknskaparreglugerð, góðkend av Innlendismálaráðnum tann 18. juni 2008.

## 2.3. UPPGÁVAN HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM

Uppgávan hjá Dátueftirlitinum er at umsita persónsupplýsingarlógina. Sambært § 37 í lógini skal Dátueftirlitið:

- Av sínum eintingum ella eftir klagu frá skrásetta ansa eftir, at viðgerð av persónsupplýsingum bert fer fram í samsvari við lógina og tær reglur, sum ásettar eru sambært lógini,
- viðgera fráboðanir og umsóknir um loyvi og áleggja treytir sambært lógarheimild,
- hava ein skipaðan almennan lista yvir allar fráboðanir og loyvir sambært lógini,
- geva ummæli til ætlaða lóggávu, sum viðvíkur persónsupplýsingum,
- gera kanningar, har persónsupplýsingar verða viðgjørdar,
- vegleiða privatum og tí almenna í ivamálum og virka fyri, at upplýsingar verða viðgjørdar sambært góðum dátuviðgerðarsiði,
- fylgja við í og kunna um gongdina í viðgerðini av persónsupplýsingum her á landi og uttanlands, og
- gera ársfrágreiðing.

Dátueftirlitið er ein eftirlitsmyndugleiki, sum skal tryggja, at persónsupplýsingarlógin verður hildin, og Dátueftirlitið hevur víðar heimildir til tess at tryggja, at reglurnar í lógini verða hildnar.

Dátueftirlitið hevur heimild til at gera kanningar á staðnum, og hevur til eina og hvørja tíð uttan dómsskurð, atgongd til øll hølir, haðani persónsupplýsingar verða viðgjørdar ella goymdar, og til øll høli har persónsupplýsingarnar ella teknisk hjálparamboð verða goymd ella nýtt.

**Fíggjarjáttanin hjá Dátueftirlitinum fyri 2008 - 2010**

*Sundurgreinað ætlan*

| Tús. kr. | 2008<br>J+EYJ | 2009<br>J | 2010<br>J |
|---|---|---|---|
| **Nettoútreiðslujáttan** | **1.890** | **2.000** | **1.984** |
| Lønir o.a. | 1.453 | 1.590 | 1.635 |
| Keyp av vørum og tænastum | 298 | 298 | 261 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 102 | 102 | 78 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 37 | 10 | 10 |

Dátueftirlitið

Dátueftirlitið virkar á einum øki, har tøkniliga menningin gongur skjótt fyri seg og nýggir trupulleikar og øki stinga seg javnan upp.



# 3 Virksemi í árinum 2010

Dátueftirlitið hevur í 2009 m.a. viðgjørt hesi sløg av málum:

- viðgjørt loyvir og fráboðanir
- vegleitt og ráðgivið almennum myndugleikum, fyritøkum og privatpersónum
- viðgjørt kærur um viðgerð av persónsupplýsingum
- verið úti á eftirliti
- svarað munnligum og skrivligum fyrispurningum
- givið loyvir til útgreinaðar telefonrokningar
- vitjað og hildið framløgur fyri fólkaskúlum og miðnámsskúlum kring landið
- ummælt uppskotum til nýggja lóggávu
- tikið mál upp av egnum ávum
- luttikið í norðurlendskum samstarvi
- samskift við ymiskar myndugleikar í samband við 3. lands góðkenningina frá ES
- gjørt bókling saman við Miðlaráðnum, Føroya Tele og SSP
- framleitt ein film saman við Miðlaráðnum
- gjørt kanning um internetnýtsluna í fólkaskúlanum.

Dátueftirlitið virkar á einum øki, har tøkniliga menningin gongur skjótt fyri seg, og nýggir trupulleikar og øki stinga seg javnan upp. Somuleiðis er lóggávan lutfallsliga nýggj, og tískil er neyðugt at menna nýggjan praksis á økinum, og í hesum sambandi er neyðugt at fylgja væl við gongdini í grannalondunum.

Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum eru nógvar og málsviðgerðin er fjøltáttað. Harumframt er økið í vøkstri og støðugari tøkniligari menning, og tí er stórur tørvur á, at Dátueftirlitið við upplýsing og vegleiðing virkar fyri, at persónsupplýsingar verða viðgjørdar sambært góðum dátuviðgerðarsiði.

Fyrispurningar kunnu vera á nógvum ymiskum økjum, men til tíðir eru afturvendandi fyrispurningar. Afturvendandi fyrispurningar hava í 2010 serliga verið um hesi evni:

- Handfaring hjá arbeiðsgevarum av teldupostkassa hjá starvsfólki, sum eru farin úr starvi
- P-talið
- Facebook og onnur sosial netverk
- Innlit
- Fyrispurningar viðvíkjandi nýggju kt-skipanini hjá bankunum
- At leggja myndir á netið
- Samankoyring av ymiskum skipanum
- Telefonskráseting
- Viðurskiftini millum arbeiðsgevarar og starvsfólk í mun til internet- og teldupostanýtslu, tá starvsfólk er til arbeiðis
- Loyvi til verkætlanir og ymiskar nøgdsemis- og heilsukanningar
- Kt-trygd
- Vakmyndatól
- Vevmyndatól

## 3.1. LUTTØKA Á NORÐURLENDSKUM MÁLSVIÐGERAFUNDI

Dátueftirlitið luttók í døgunum 26. til 28. mai 2010 á norðurlendskum málsviðgerafundi, Hetta er fundur, sum verður hildin á hvørjum ári, har umboð fyri Føroyar, Ísland, Noregi, Svøríki, Finland, Áland og Danmark luttaka at umrøða ymisk viðurskifti, sum hava felags áhuga. Í ár varð fundurin hildin í Reykjavík.

Somuleiðis luttók Dátueftirlitið í døgunum 14. til 17. september 2010 á norðurlendskum fundi, har ymisk meira teknisk viðurskifti, sum hava felags áhuga vóru umrødd. Fundurin í ár varð hildin í Keypmannahavn.

Nærri frágreiðing frá norðurlendsku fundunum er at finna undir pkt. 5.2 í hesi ársfrágreiðing.

## 3.2. TRYGGARI INTERNETDAGUR

Tann 9. februar í ár varð Tryggari internetdagur hildin í Føroyum. Hetta er eitt árligt afturvendandi tiltak, sum verður hildið í yvir 65 londum kring heimin og har tað verður varpað ljós á tryggari internetnýtslu á ymiskan hátt, serliga hjá børnum. Hetta er fyrsta árið, at dagurin verður hildin í Føroyum, og ætlanin er, at dagurin verður hildin á hvørjum ári.

Dátueftirlitið, Miðlaráðið og Barnabati høvdu tikið stig til saman at varpa ljós á tryggari internetnýtslu við ymiskum tiltøkum. Millum annað skipaði Dátueftirlitið fyri tíðindafundi, har Dátueftirlitið legði fram eina kanning um internetnýtsluna hjá næmingum í 3., 4. og 8. og 9. flokki. Dátueftirlitið hevur í januar 2010 spurt 400 næmingar (100 í hvørjum árgangi) ymsastaðni í Føroyum fleiri spurningar viðvíkjandi teirra internetnýtslu. Spurt varð m.a. hvussu nógv tey brúktu internetið, hvar tey høvdu vangamyndir, um tey løgdu myndir av øðrum út á netið uttan at spyrja um loyvi, tagging, o.a.

Kanningin, sum Dátueftirlitið hevur gjørt av internetnýtsluni hjá fólkaskúlanæmingum kring landið, vísir, at talið av børnum og ungum, sum nýta sosial netverk á internetinum er stórt.

Sambært kanningini eru 78% av næmingunum á internetinum hvønn dag ella næstan hvønn dag, og hyggja vit eftir tølunum fyri 3. flokk, so eru 55% av næmingunum á netinum hvønn dag ella næstan hvønn dag.

Kanningin vísir, at heili 90% av næmingunum hava eina vangamynd á internetinum, í 3. flokki hava 72% eina vangamynd á netinum. Tær best umtóktu síðurnar eru Facebook. Arto og MSN.

Kanningin vísir eisini, at umleið fjórði hvør næmingur í 3. og 4. flokki hevði vent sær til foreldur ella lærara, um tey høvdu fingið eitt sms ella eina viðmerking á teirra vangamynd, sum gjørdi tey kedd ella súr.

Tað at talið av næmingum, sum hava eina vangamynd á netinum er so stórt, ger, at tað hevur stóran týdning, at børn og ung verða kunnað um, hvørjar skrivaðar og óskrivaðar reglur eru galdandi fyri sosiala lívið á netinum. Hetta setir krøv til bæði skúlar og foreldur, bæði at læra tey ungu, hvussu stóran týdning tað hevur at verja sínar upplýsingar á netinum, og hvørjar reglur eru galdandi fyri, hvussu tey kunnu handfara upplýsingar og myndir um onnur.



Virksemi í árinum 2010

Til tryggari internetdagin hevði Ingunn Eiriksdóttir, stjóri í Dátueftirlitinum, skrivað grein við góðum ráðum um, hvussu foreldur kunnu stuðla børnum teirra, tá tey ferðast á netinum. Dátueftirlitið heitti á foreldur um at nýta høvið henda dagin at seta seg saman við børnunum og tosa um, hvat tey gera á internetinum, hvørji spøl tey spæla og hvørjar vinir tey hava á teim ymsu sosialu netsíðunum.

Dátueftirlitið sendi somuleiðis í sambandi við dagin áheitan til allar fólkaskúlar í Føroyum um at seta fokus á tryggari internetnýtslu týsdagin 9. februar 2010, m.a. við góðum ráðum um, hvussu vit kunnu ferðast tryggari á internetinum.




## 10 GÓÐ RÁÐ UM GÓÐA SIÐVENJU Á NETINUM

1. Gev ongantíð einum, tú ikki kennir, navn og bústað tín
2. Tú kanst hava eitt kelinavn ella geva teg út fyri at vera okkurt annað, um tú bert hevur góðar ætlanir
3. Minst til, at tann tú kjattar við, ikki altíð er tann, hann ella hon sigur seg vera
4. Ikki siga nakað, sum tú ikki meinar, tí tað kann enda galið, um tann tú sigur tað við, ikki skilir tað
5. Tú mást ikki málbera teg rasistiskt, tí tað er í roynd og veru ólógligt
6. Ikki arga nakran við teirra útsjónd, tí tað kann vera ógvuliga særandi
7. Lat vera við at happa ella arga onnur, tí tað kann vera ógvuliga særandi
8. Hugsa teg um, áðrenn tú sendir ein teldupost ella sms, tí tá móttakarin hevur sæð hann, vendist ikki aftur
9. Ikki hótta onnur fyri stuttleika, tí tað kann vera trupult at finna útav
10. Ikki halda onnur uttanfyri, uttan so at tú hevur eina góða grund.

## KJATTA TRYGT

1. Set tíni mørk
2. Tú mást ongantíð hitta ein kjattvin einsamallur/einsamøll
3. Gev ikki frá tær persónligar upplýsingar
4. Reagera og goym prógv
5. Tosa við onkran, tú hevur álit á

## 3.3. BÓKLINGUR

Dátueftirlitið gjørdi í 2010 ein nýggjan bókling um tryggari nýtslu á internetinum. Bóklingurin hevur heitið "Tað er tín avgerð 2", og vendir sær serliga til børn í aldrinum 9-12 ár og er egnaður bæði til skúlabrúk og at lesa heima saman við foreldrunum.

Dátueftirlitið er javnan úti á skúlum og greiðir børnum og ungum frá, hvussu tey kunnu ferðast tryggari á internetinum. Eisini hava umboð fyri Dátueftirlitið luttikið á felags foreldrafundum, har greitt hevur verið frá arbeiðinum hjá Dátueftirlitinum viðvíkjandi







Orsøkin til at farið var undir at gera ein nýggjan bókling er, at Dátueftirlitið hevur merkt ein øktan tørv á tilfari til tey yngru børnini og fær javnan fráboðanir um óhepnar hendingar á netinum, har børn eru upp í. Somuleiðis vísti ein kanning, sum Dátueftirlitið gjørdi av internetnýtsluni í fólkaskúlanum, at føroysk børn eru sera ung, tá ið tey byrja at hava vangamyndir á ymsum sosialum netsíðum. Harafturat hava lærarar og foreldur sóknast eftir tilfari til henda málbólkin.

Í samband við at bóklingurin varð almannakunngjørdur, skipaði Dátueftirlitið fyri tíðindafundi, har Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, sum varðar av lógarøkinum, eisini luttók.

Somuleiðis gjørdi Dátueftirlitið eina vegleiðing til uppgávurnar í bóklinginum sum hjálp til lærarar og onnur, sum hava hug at brúka hann.

børnum og ungum, og har kjakast hevur verið um, hvønn leiklut foreldur og skúli hava.

Í 2010 hevur Dátueftirlitið verið á hesum støðum:

- 25. januar: Framløga í skúlanum í Hvalba
- 12. februar: Framløga fyri 1. HH3 á Kambsdali
- 19. februar: Framløga fyri lærarum á Handilsskúlanum á Kambsdali
- 7. september: Framløga fyri nýggjum næmingum á Føroya Handilsskúla í Tórshavn
- 19. oktober : Framløga í Vestmanna skúla
- 4. november: Felags foreldrafundur í Vestmanna skúla
- 18. november Felags foreldrafundur í Sankta Frants skúla
- 1. december: Framløga fyri 3.-6. floks børnum í Margarinfabrikkini
- 3. december: Framløga fyri 3.-6. flokki í Eysturskúlanum.

## 3.4. EFTIRLIT

Dátueftirlitið framdi í 2010 eftirlit hjá einari privatari fyritøku og í Norðoya- og Vágatunlinum. Eftirlitið varð fráboðað frammanundan.

Eftirlitið á privatu fyritøkuni snúðu seg um at kanna eftir, um reglurnar um vakmyndatól vóru hildnar, herundir fráboðanarskyldan, um kt-trygd og um trygdina í sambandi við viðgerð av starvsfólkaupplýsingum umvegis vakmyndatól.

Eftirlitið varð gjørt av tveimum starvsfólkum á Dátueftirlitinum. Á eftirlitinum varð staðfest, at ymisk viðurskifti vóru ikki nøktandi, og fingu dátuábyrgdararnir boð um at gera ymisk teknisk og fyriskipanarlig tiltøk, sum skuldu tryggja, at reglurnar í persónupplýsingarlógini verða hildnar.

Eftirlitsfrágreiðing er skrivað, og ein stuttur samandráttur av niðurstøðunum frá eftirlitunum er at finna undir pkt. 6 í hesi ársfrágreiðing. Eisini ber til at lesa frágreiðingina frá eftirlitunum í fullum líki á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum.

MYND 1 - Bólking av málum í 2009




## 3.5. HAGTØL FYRI 2010

Upplýsingarnar í hesum partinum av ársfrágreiðingini eru grundaðar á skrásetingina av nýggjum málum í skjalaskránni hjá Dátueftirlitinum fyri 2010, og eru sostatt bara viðvíkjandi nýggjum málum. Ein stórur partur av málunum hjá Dátueftirlitinum er ofta framhald av gomlum málum, t.d. broytingar í givnum loyvum ella fráboðanum. Hesi mál eru ikki tikin við í hetta yvirlitið, sum bara snýr seg um mál, sum eru stovnað í 2010.

Í tíðarskeiðinum 1. januar til 31. desember 2010 vórðu 200 nýggj mál skrásett, og er hetta á leið tað sama sum í 2009, tá 190 mál vórðu stovnað.

Mynd 1 niðanfyri vísir talið av málum og munnligum fyrispurningurm frá 2006 til og við 2010.

MYND 2. Bólking av nýstovnaðum málum í 2010 í tølum




MYND 3. Málsbýti í prosentum í mun til myndugleikar, fyritøkur o.t. 2009/2010

Her sæst, at tað í stóran mun eru almennir myndugleikar, málini snúgva seg um.




| Í 2010 vóru tølini hesi: | |
|---|---|
| Almennir myndugleikar, stovnar o.t. | 58% |
| Privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.t. | 16% |
| Privatpersónar | 22% |
| Kommunur | 3% |
| Annað | 1% |

MYND 4. Málsbýti í mun til evnisbólkar




| Málini kunnu í høvuðsheitum býtast upp á hesar evnisbólkar: | |
|---|---|
| Vakmyndatól | 12% |
| Gransking | 13% |
| Starvsfólkaviðurskifti | 10% |
| Kt-trygd | 3% |
| Sosialar netsíður | 10% |
| Ummæli/hoyring | 15% |
| P-tøl | 7% |
| Telefonsamskifti | 3% |
| Eftirlit | 2% |
| Innanhýsis mál | 11% |
| Annað | 14% |

Virksemi í árinum 2010

## 3.6. MUNNLIGIR FYRISPURNINGAR:

Talið av munnligum fyrispurningum í ár er vaksið við 9% í mun til í fjør.

Í 2007 byrjaði Dátueftirlitið at skráseta munnligar fyrispurningar, sum vórðu avgreiddir umvegis telefon. Í hesum bólki eru bara skrásettir fyrispurningar, har borgari ella myndugleikar fáa beinleiðis vegleiðing umvegis telefon, og tað ikki snýr seg um samskifti í samband við verandi ella komandi mál.

Á mynd 5 sæst, hvussu teir munnligu fyrispurningarnir, sum vórðu avgreiddir í 2010, kunnu bólkast.




| Málsbýti í mun til myndugleikar, fyritøkur, privatpersónar, kommunur og advokatar: | |
|---|---|
| Almennir myndugleikar, stovnar o.t. | 27% |
| Privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.t. | 20% |
| Privatpersónar | 41% |
| Kommunur | 7% |
| Advokatar | 5% |

***Almennir myndugleikar, stovnar o.t.***

Fyrispurningarnir í hesum bólki hava serliga verið um, nær og hvussu ymisk skráseting er loyvd, og nær tað er loyvt at lata víðari viðkvæmar persónsupplýsingar sambært persónsupplýsingarlógini. Fleiri fyrispurningar hava verið frá skúlum og øðrum myndugleikum um myndir, upptøkur og annað, sum verða løgd á sosialar netsíður, YouTube o.s.fr. Eins og undanfarnu árini hava fleiri fyrispurningar verið um p-talið, um samkoyring av upplýsingum í ymiskum skráum, um innlit og ymiska starvsfólkaskráseting. Fyrispurningarnir í sambandi við starvsfólkaskráseting hava ofta snúð seg um, hvussu ella undir hvørjum treytum ein arbeiðsgevari kann fáa atgongd til ymiskar upplýsingar úr teldupostskipanini hjá starvsfólki ella aðrar loggupplýsingar um starvsfólk, bæði tá fólk eru í starvi, í samband við uppsagnartilgongd, og eisini aftaná at hesi eru farin úr starvi. Fyrispurningar hava eisini verið um greinir hjá starvsfólkum á kjaksíðum, og um nýtslu av sosialum netverkssíðum.

***Privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.t.***

Flestu fyrispurningar frá privatum fyritøkum og arbeiðsgevarum hava í 2010 snúð seg um vakmyndatól, um nýtslu av p-talinum og um viðgerð av persónsupplýsingum í ymiskum starvsfólkaviðurskiftum, herundir um at eftirkanna heimasíðunýtslu hjá starvsfólki, um innlit í teldupostsamskifti hjá starvsfólki, um skráseting av telefonsamskifti hjá starvsfólkum, um nýtslu av sosialum netverkssíðum og um at flyta persónsupplýsingar av landinum. Eisini hava onkrir fyrispurningar hetta árið verið um, hvussu upplýsingar í teldupostskipanum o.ø. skulu handfarast, eftir at starvsfólk eru farin úr starvinum. Nakrir fyrispurningar hava somuleiðis verið í samband við kredittupplýsingarvirksemi og um at fáa útgreinaða telefonrokning.

***Privatpersónar***

Rættiliga nógvir av fyrispurningunum frá privatpersónum hava í ár verið um ymisk viðurskifti í sambandi við, at bankarnir fluttu kt-skipan frá Elektron til SDC. Somuleiðis hava nógvir fyrispurningar verið um myndir, filmar og útspilling á netsíðum sum Facebook og YouTube. Eisini hava onkrir fyrispurningar verið frá starvsfólki, sum eru søgd úr starvi, og sum vilja vita, hvussu arbeiðsgevarin kann nýta tilfar og upplýsingar, sum liggja í teldupostskipanini hjá viðkomandi. Fyrispurningar hava verið um skráseting av persónsupplýsingum í samband við høvuðsuppgávu ella phd-lestur, um ymiskar spurnakanningar, um ættargransking, um happing á internetinum, um vakmyndatól, um GPS, um skráseting av upplýsingum í Arto og Facebook, og eins og undanfarnu ár hava fleiri fyrispurningar verið um nýtslu av p-talinum.

***Kommunur***

Fyrispurningarnir frá kommununum hava hetta árið serliga verið um nýtslu av p-talinum og ymiska samankoyring av skráum. Somuleiðis hava fyrispurningar verið um vakmyndatól, vevmyndatól og nýtslu av GPS. Eisini hava fyrispurningar verið um innlit, um myndir og filmsklipp á netinum, m.a. um floksmyndir av børnum á internetinum og um Total View.

***Advokatar***

Fyrispurningarnir frá advokatum hava í 2010 serliga verið um innlit í arbeiðsrelateraðan teldupost hjá starvsfólkum, um ymisk viðurskifti í samband við uppsagnarmál, um víðarilatan av viðkvæmum upplýsingum og um Intrum.

## 3.7. LOYVIR OG FRÁBOÐANIR

Ein av høvuðsuppgávunum hjá Dátueftirlitinum sambært § 37 í persónsupplýsingarlógini er at viðgera umsóknir um loyvir og fráboðanir.

***Viðgerðarloyvi:***

Eitt viðgerðarloyvi er eitt loyvi frá Dátueftirlitinum um, at viðkomandi stovnur, felag, persónur ella annar hevur loyvi at viðgera ávísar viðkvæmar persónsupplýsingar til eitt ávíst endamál og undir ávísum treytum. Viðgerðarloyvi eru oftast tíðaravmarkað. Søkjast kann um loyvi við at útfylla eitt oyðublað á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, og senda tað inn umvegis heimasíðuna ella við postinum. Í høvuðsheitum krevst loyvi frá Dátueftirlitinum til eina viðgerð, tá viðkvæmar persónsupplýsingar verða viðgjørdar, tó eru undantøk til hesa reglu. Viðkvæmar persónsupplýsingar eru upplýsingar um: lit og ættarslag, um átrúnaðarliga, heimsspekiliga ella politiska sannføring, um revsiverd og kynslig viðurskifti, heilsustøðu, yrkisfelagsligt tilknýti, munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti. Í kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi eru ásett ymisk undantøk til reglurnar um viðgerðarloyvi.

***Fráboðan:***

Tá viðgerðarloyvi ikki krevst til eina viðgerð, skal henda tó sum høvuðsregla fráboðast Dátueftirlitinum. Hetta merkir, at Dátueftirlitið skal hava eina frágreiðing um, at viðkomandi ætlar at viðgera ávísar persónsupplýsingar. Ein fráboðan kann gerast við at útfylla eitt oyðublað (fráboðanarskjal) á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, og senda tað inn umvegis heimasíðuna ella við postinum. Fráboðanin skal latast Dátueftirlitinum í seinasta lagi 30 dagar, áðrenn viðgerðin er ætlað at byrja. Tríggjar kunngerðir eru gjørdar við undantøkum til fráboðanarskylduna. Hetta merkir í høvuðsheitum, at um persónsupplýsingar, sum eru ikki viðkvæmar, verða viðgjørdar, skal henda viðgerð ikki fráboðast Dátueftirlitinum. Flestu fráboðanirnar, sum Dátueftirlitið hevur fingið hetta árið, hava snúð seg um at flyta persónsupplýsingar av landinum og um vakmyndatól.

### 3.7.1. Loyvi til verkætlanir

Dátueftirlitið hevur í 2010 givið loyvi til ymiskar verkætlanir. Av hesum verkætlanum kunnu m.a. nevnast hesar:

### 3.7.2. Verkætlan: Nøgdsemiskanning í Sjúkrahúsverkinum

**Dátuábyrgdari:** Heilsumálaráðið (Poul Geert Hansen).

**Endamál:** At kanna nøgdsemið hjá sjúklingum á føroysku sjúkrahúsunum.

**Háttur:** Verkætlanin fevnir um eina kanning millum 1000 sjúklingar, sum eru útskrivaðir frá teimum trimum føroysku sjúkrahúsunum í tíðarskeiðinum januar til mars 2010. Kanningin verður gjørd við spurnabløðum og er ein navnloynd kanning.

**Viðgerðarloyvi:** Viðgerðarloyvi varð givið tann 29. apríl 2010 við ávísum treytum.

Loyvið er galdandi til 31. desember 2010, tá tað skal endurskoðast.

### 3.7.3 Verkætlan: "Screening af færøske 9. klasses elever for type 2 diabetes risiko"

**Dátuábyrgdari:** Virkandi sjúkrahússtjórin Jóannes Erik Køtlum.

**Endamál:** At finna fram til "risikofaktorar" fyri type 2 diabetes hjá einum heilum árgangi av 9. floks næmingum í øllum Føroyum.

**Hættur:** Verkætlanin fer fram partvíst á diabetesambulatoriinum og rannsóknarstovuni á Landssjúkrahúsinum og partvíst í skúlunum um landið. Harumframt fáa næmingarnir spurnablað, sum foreldur/verjar verða biðin um at svara saman við næminginum. Luttøkan í kanningini er sjálvboðin og kann einans verða gjørd við samtykki.

**Viðgerðarloyvi:** Viðgerðarloyvi varð givið tann 16. november 2010 við ávísum treytum.

Vísindasiðsemisnevndin hevur tann 26. oktober 2010 givið loyvi til verkætlanina, galdandi frá oktober 2010 til februar 2011.

### 3.7.4. Aðrar verkætlanir, sum ikki hava kravt loyvi frá Dátueftirlitinum

Dátueftirlitið hevur í 2010 viðgjørt aðrar verkætlanir, har niðurstøðan hjá Dátueftirlitinum hevur verið, at loyvi frá Dátueftirlitinum ikki krevst til viðkomandi verkætlanir. Talan hevur verið um verkætlanir, har persónar ikki kunnu eyðmerkjast og um verkætlanir, har viðkvæmar persónsupplýsingar ikki hava verið viðgjørdar. Nevnast kann m.a. ein granskingarverkætlan, sum snýr seg um børn og ung, og hvussu teirra fatan av skúla hevur ávirkan á framtíðar útbúgvingar- og yrkisval, serstakliga hvørji samanføll og hvørjir munir eru millum kynini, grundað á føroysk hagtøl, sum vísa, at væl fleiri kvinnur enn menn eru undir hægri lesnaði. Ein onnur verkætlan er hjá Fólkaheilsuráðnum, sum er farið undir "fyribyrgjandi tiltøk móti kynssjúkuni klamydia".

### 3.7.5. Ílegusavnið (Fráboðaðar granskingarverkætlanir)

Ílegusavnið varð sett á stovn við løgtingslóg nr. 62 frá 17. mai 2005 um gransking í mannaílegum (Ílegulógin) og í §§ 3-5 og 7 hevur Ílegusavnið lógarheimild at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar. Dátueftirlitið metir, at heimildin hjá Ílegusavninum í §§ 3-5 og 7 í Ílegulógini til at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar eisini fevnir um at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar í ítøkiligu verkætlanunum.

Av tí at Ílegusavnið sostatt hevur lógarheimild at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar, krevst onki viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum. Hetta fylgir av reglunum í § 1, nr. 3 í kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi



og hevur hetta við sær, at loyvi ikki krevst frá Dátueftirlitinum til ítøkiligu verkætlanirnar hjá Ílegusavninum, men at hesar tó skulu fráboðast Dátueftirlitinum sambært § 32 í persónsupplýsingarlógini. Dátueftirlitið hevur upp á ítøkiligan fyrispurning svarað Ílegusavninum, at mett verður ikki, at tað ber til at gera eina fráboðan, sum fevnir um bæði generellu skipanina og verkætlanir sum heild, orsakað av at viðgerðirnar eru ymiskar í mun til § 34 í persónsupplýsingarlógini. Verkætlanirnar skulu sostatt fráboðast Dátueftirlitnum í hvørjum einstøkum føri.

***Í 2010 hevur Ílegusavnið fráboðað hesar verkætlanir:***

- Epidemiologisk verkætlan viðvíkjandi multipel sklerose
- "Epidemiological study of Chron's disease, ulcerative colitis and inderterminante colitis in the Faroes"
- Epidemiologisk verkætlan viðvíkjandi alopecia areata
- Granskingarverkætlan "Genetisk basis for Idiopatisk Generaliseret Epilepsi (IGE) i befolkningen på Færøerne"
- "An epidemiological study of suspected Neuronal ceroid lipofuscinosis cases (NCL)"
- Verkætlan viðvíkjandi hallux valgus
- Verkætlan innan Parkinson-sjúku

## 3.8. HOYRINGAR

### 3.8.1. Lógaruppskot

Dátueftirlitið hevur í árinum fingið hesi lógaruppskot til hoyringar:

- Broyting í løgtingslóg um postvirksemi
- Broyting í løgtingslóg um kringvarp til hoyringar
- Broyting í lóg um fíggjarligt virksemi o.a.
- Broyting í lóg um "Danmarks Nationalbank"
- Broyting í lóg um "tv-overvågning"
- Løgtingslóg um gymnasialar útbúgvingar
- Møguligar broytingar í persónspplýsingarlógini
- Løgtingslóg um tilbúgving
- Løgtingslóg um manntal
- Broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul
- Broyting í lóg um "patienters retstilling"

### 3.8.2. Kunngerðir

Dátueftirlitið hevur í árinum fingið hesar kunngerðir til ummælis:

- Kunngerð um "garantifond for indskydere og investorer"
- Kunngerð um "Ajourføring af den finansielle lovgivning på Færøerne"
- Kunngerð viðvíkjandi broyting í sambandi við bankapakka III
- Kunngerð fyri Føroyar um "pengeinstitutters pligt til at offentliggøre Finanstilsynets vurdering af instituttet"
- Kunngerð um "Finansiel Stabilitet A/S' afvikling af nødlidende pengeinstitutter samt betaling af risikopræmie"
- Kunngerð um "afviklingsberedskab"
- Kunngerð fyri Føroyar "Lov om behandling af personoplysninger for rigsmyndighedernes behandling af oplysninger"

### 3.8.3. KT-politikkur

Almennir myndugleikar hava í árinum vent sær til Dátueftirlitið við fyrispurningum um ymiskt í samband við kt-trygd og kt-politikk yvirhøvur. Dátueftirlitið hevur í hesum sambandi kannað eftir um kt- politikkurin er beinleiðis í stríð við persónsupplýsingarlóggávuna og annars vegleitt og ráðgivið um ymisk viðurskifti í hesum sambandi.




## 3.9. VEGLEIÐINGAR

Í 2010 hevur Dátueftirlitið gjørt fleiri vegleiðingar, sum eisini eru at finna á www.datueftirlitid.fo

### 3.9.1. Upplýsingar til foreldur um at verja persónligar upplýsingar á Facebook

Dátueftirlitið vil við hesum vísa á hvussu foreldur kunnu hjálpa sínum børnum, tá tey eru á Facebook. Niðanfyri er svar frá Facebook uppá ofta settar spurningar.

**Hvørjar uppsetingar bjóða tit til at verja persónligar upplýsingar**
Allir Facebook-brúkarar hava møguleika fyri at gera teirra egnu privatuppsetingar. Brúkarar kunnu seta avmarkingar fyri, hvør kann síggja teirra vangamynd (t.d. øll, bara vinir o.s.fr.). Teir kunnu eisini velja, hvør kann síggja ávísan part av teirra vangamynd ( t.d. persónligar upplýsingar, CV, arbeiðssøgu o.t.) Privatuppsetingar kunnu latast upp við leinki ”konta”, sum er at finna ovast til høgru á øllum síðunum á netinum, og far so inn á ”privatpolitikkur”.
http://www.facebook.com/help/?faq_1605

**Hvussu hjálpi eg mínum barni at brúka hesa netsíðu skilagott?**
Tað besta, tú kanst gera, er at tosa við børnini og læra tey um internettrygd. Lær tey at:

- Tey ongantíð mugu lata loyniorðið frá sær
- Skilja teirra privatu uppsetingar
- Melda persónar, sum bróta okkara fráboðan um rættindi og ábyrgd
- Forða persónum, sum møguliga senda óynskt tilfar

http://www.facebook.com/help/?faq=16107

**Hvørjar aðrar møguleikar hevur tú viðvíkjandi internettrygd?**
Her eru nakrar netsíður, sum tú kanst brúka:

- OnguardOnline.gov
- WiredSafety.org
- Commonsense.com
- Ncmec.org
- TRUSTe.org
- ConnectSafely.org
- NetSmartz.org
- WebWiseKids.org

http://www.facebook.com/help/?faq=16108

**Hvussu kann eg fáa atgongd til at strika vangamyndina hjá mínum barni, tá barnið er 13 ár og eldri?**
Vit skilja væl, at tú ert kedd av, at títt barn brúkar netsíðuna, men tíverri kunnu vit ikki geva tær atgongd til vangamyndina ella gera nakað í hesum sambandi, um tú biður um tað. Vit hava sambært lóg um verju av persónligum upplýsingum generelt ikki loyi til at geva óskrásettum atgongd til onnur enn tann, sum eigur vangamyndina. Legg til merkis, at allir brúkarar 13 ár og eldri eru at meta sum skrásettir eigarar av vangamyndum og soleiðis eru umfataðir av hesum reglum.

Vit ráða foreldrum til at hava øll møgulig trygdartiltøk á teirra egnu teldum og at halda eyga við, hvussu børnini brúka netið. Um tú ert foreldur, kanst tú umhugsa at brúka softwareamboð á tínari egnu teldu til tílíkt endamál.

Tosa eisini við børnini og lær tey um internettrygd og bið tey um at brúka okkara privatuppsetingar.
http://www.facebook.com/help/?faq=16104

**Hvat nú, um mítt barn sær óhóskandi ella ónærisligt tilfar á netsíðuni?**
Facebook ansar væl eftir trygdini hjá brúkarunum, og vit leggja nógva orku í at strika møguligt tilfar, sum er átaluvert. Vit heita á brúkarar um at boða frá ónærisligum vangamyndum, frágreiðingum, bólkum, hendingum og myndum. Facebook kannar evnir, sum verða fráboðað, og verða tey strikað, um mett verður at tey eru í stríð við okkara áseting um rættindi og ábyrgd. Brúkari kann eisini ”blokera” aðrar brúkarar og harvið tryggja, at brúkarin ikki er at finna í leitingum, ikki kann síggja vangamynd ella senda viðkomandi boð.
http://www.facebook.com/help/?faq=16106

**Hvat hendir, um mítt barn stovnar eina vangamynd og er yngri enn 13 ár?**
Facebook krevur, at allir brúkarar eru minst 13 ár fyri at kunna stovna eina vangamynd. At geva skeivar upplýsingar fyri at stovna eina vangamynd er í stríð við okkara áseting um rættindi og ábyrgd. Um tú vilt boða frá einum yngri enn 13 ár, sum hevur eina vangamynd, kanst tú gera tað her. Vit strika umgangandi vangamyndir, sum yngri enn 13 ár hava stovnað, um tílík viðurskifti verða fráboðað okkum við hesum oyðublaðnum.

Harumframt kann galdandi lóggáva geva foreldrum atgongd til persónligar upplýsingar, sum teirra barn hevur givið, áðrenn Facebook fer inn og brúkar sínar egnu reglur og umgangandi strikar tílíka vangamynd. Tú kanst fáa atgongd til vangamyndina og neyðugu persónligu upplýsingarnar við at fáa barnið at fara inn á sína vangamynd. Síðan kanst tú strika vangamyndina við at fylgja leiðbeiningini her.

Ein annar máti er at senda eina áheitan á Facebook her. Hav í huga, at tú skalt senda eina váttan um tíni rættindi sum foreldur ella verji beint eftir at tú hevur nýtt hetta oyðublaðið.
http://www.facebook.com/help/?faq=16109

### 3.9.2. Soleiðis strikar tú falskar vangamyndir av heimasíðuni

Støðugt fleiri verða varug við, at onnur leggja vangamyndir í teirra navni á Facebook. Soleiðis kanst tú strika falskar vangamyndir :

Norskir miðlar hava seinastu tíðina gjørt nógv burturúr, at nøvn verða misnýtt á Facebook. Fleiri kend fólk hava verið úti fyri, at vangamyndir í teirra navni hava sett seg í samband við kend og ókend gjøgnum internetið. Tey hava sjálvi ikki vitað um hetta virksemi, fyrrenn onnur hava gjørt tey varug við tað. Norska dátueftirlitið hevur somuleiðis fingið fleiri áheitanir frá fólki, sum hava trupulleikar við tí sama. Men uppskriftin upp á at fáa strikað eina falska vangamynd av netinum er tíbetur einføld.

Her eru tveir møguleikar:

1. Ein møguleiki er at fara beinleiðis inn á Facebook (krevur ikki at vera loggað á): http://www.facebook.com/help/contact.php?show_form=report_fake_profile. Her skalt tú kopiera netbústaðin á tí vangamyndini, sum tú vilt hava strikaða, umframt aðrar upplýsingar, sum tú hevur um ta vangamyndina. Legg eisini við tín teldupostbústað, soleiðis at Facebook møguliga kann seta seg beinleiðis í samband við teg fyri at kunna staðfesta at, nevnda vangamynd er følsk
2. Á øllum vangamyndum, sum tú ikki hevur lagt sum "vinur" er ein leinki í vinstru síðu undir myndini, sum eitur "Report/block this person". Tá tú klikkjur á hesa, kanst tú boða frá, at hetta er myndin, sum talan er um.

Facebook mælir sjálv til hesa mannagongd, men tíverri hevur mannagongdin víst seg at hava ein trupulleika, sum vísir seg við, at tú fært "feilmelding", tá tú roynir at senda inn fráboðan á henda hátt. Norska dátueftirlitið hevur sent boðini víðari til Facebook viðvíkjandi trupulleikanum, og hava tey lovað at kanna málið.

**Revsivert**

At stovna eina falska vangamynd í øðrum navni kann ofta verða mett sum ein beistagerð, men tílík misnýtsla kann í ringasta føri verða revsiverd.

Fólk hava álit á Facebook, júst tí at tey rokna við, at tú ert tann, tú sigur teg vera. At innheinta upplýsingar um onnur undir følskum samleika og misnýta hesar upplýsingar er ólógligt.

Dátueftirlitið í Noregi er í ferð við at stovna tænastuna "Slettmeg.no", sum væntandi verður kunngjørd í hesum mánaðinum. Endamálið við tænastuni er at geva fólki ráð og vegleiðing, tá ið tey kenna seg eyðmýkt á netinum. "Vit bjóða hesa vegleiðing og tekniska hjálp til at koma í samband við ymiskar nettænastur. Vit hava m.a. setta á stovn beinleiðis samband við Facebook".

Slíkt samband halda vit fer at verða til nyttu bæði fyri brúkaran og neteigaran, greiðir norska Dátueftirlitið frá. "Hvørgin parturin kann hava gleði av, at nettænastan er full av følskum vangamyndum".

*Kelda : Norska Datatilsynet*



Virksemi í árinum 2010

### 3.9.3. Handfaring av teldupostkassa hjá starvsfólki

Dátueftirlitið fær javnan fyrispurningar um handfaring av teldupostkassa hjá starvsfólki, sum eru farin úr starvi, starvsfólk sum eru søgd úr starvi, sjálvi hava sagt seg úr starvi, eru í farloyvi ella eru deyð.

**Persónsupplýsingarlógin**

Dátueftirlitið umsitur persónsupplýsingarlógina. Endamálið við persónsupplýsingarlógini er at tryggja persónsverndina einstaka soleiðis, at persónsupplýsingar m.a. verða viðgjørdar við virðing fyri persónliga frælsinum. Ein av meginreglunum 8 í lógini er, at persónsupplýsingar bert verða viðgjørdar, um tær eru viðkomandi og ikki fevna um meira enn krevst røkka endamálinum við innsavnanini. Harafturat skulu persónsupplýsingar bert viðgerast, um tað er sakligt og neyðugt.

**Mannagongdir**

Dátueftirlitið mælir til, at arbeiðsgevarar hava mannagongdir fyri, hvussu farast skal fram, tá ið starvsfólk koma starvi og tá tey fara úr starvi.

Í samband við teldupostkassan hjá starvsfólki, so verður skilt í millum privatan og arbeiðsrelateraðan teldupost. Privatur teldupostur verður mettur sum eitt bræv, sum er vart av reglunum um brævloynd í § 263 í revsilógini, tvs. at bert telduposturin er skrivaður til, hevur rætt til at lesa teldupostin. Tá talan er um at lesa arbeiðsrelateraðan teldupost, arbeiðsgevarin í nøkrum førum rætt til at kanna hesar. Í hvørjum førum og eftir hvørjum treytum, hetta ber til, má hvørjum einstøkum føri.

Dátueftirlitið mælir eisini til, at arbeiðsgevarar við setan upplýsa starvsfólkum um loyvt er at nýta arbeiðstelduna ikki. Um so er, at ongar reglur eru á arbeiðsplássinum um hesi viðurskifti, so verður í dag gingið út frá, at starvsfólk mun hava rætt til at nýta arbeiðstelduna privat.

Dátueftirlitið mælir annars til, at starvsfólk halda privatan teldupost og arbeiðsrelateraðan teldupost burtur frá hvørjum við td. at gera serligar mappur til privatan teldupost, og at privat skjøl vm. verða goymd fyri seg.



Áðrenn starvsfólk fara úr starvi/gevast í fyritøku, skulu tey hava møguleika fyri at rudda upp í sínum privatu viðurskiftum. Hetta kann eisini gerast saman við einum álitisfólki, um arbeiðsgevarin krevur tað.

Teldan, sum verður brúkt á arbeiðsplássinum, er eitt arbeiðsamboð, sum arbeiðsgevarin eigur, og arbeiðsrelateraður teldupostur má tískil roknast sum arbeiði gjørt vegna arbeiðsgevaran.

Dátueftirlitið metir, at um arbeiðstakarin hevur nóg rúma tíð og møguleika at rudda upp í privatum teldupostum, so kann arbeiðsgevarin í serligum føri, har tað er neyðugt at sleppa fram at teldupostinum, ið hevur við arbeiðið at gera. Mælt verður til, at álitisumboð ella annað umboð fyri arbeiðsgevarar er til staðar í slíkum føri.

**Sjálvvirkin svarboð**

Tá ið starvsfólk fara úr starvi ella fara í farloyvi, mælir Dátueftirlitið til, at sjálvvirkin svarboð verða løgd á teldupostin hjá viðkomandi

starvsfólkum, sum sigur frá, at viðkomandi ikki er í starvi longur/hevur farloyvi. Haraftur-at skal upplýsast hvør, ið hevur yvirtikið arbeiðsuppgávurnar hjá viðkomandi, soleiðis at møguleiki er at senda teldupostin umaftur til rætta starvsfólkið. Hetta skuldi havt við sær, at tað ikki gjørdist neyðugt at fáa fatur á leypandi inngangandi posti, ið hevur við sama arbeiðsøkið at gera.

Dátueftirlitið kann í hesum sambandi somu-leiðis upplýsa, at arbeiðsgevarin hevur ikki sakliga grund til at varðveita teldupostkassa í navninum hjá fólki, sum ikki longur eru í arbeiði. Teldupostkassin eigur tí at verða strikaður, so skjótt sum viðkomandi ikki er í starvinum longur. Tó verður arbeiðsgevarin sjálvsagt noyddur at tryggja sær, at hann fær teir teldupostar, sum hava við arbeiðið at gera, og sum eru ella verða sendir til viðkomandi.

**Upplýsingar á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum**

Upplýsingar um ymisk viðurskifti millum arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar eru at finna á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum www.datueftirlitid.fo undir punktinum "Arbeiðs-marknaður." Tey mál, sum hava verið til viðgerðar, vísa greitt, at tørvur er á meira kunning, og fer Dátueftirlitið í næstum at gera vegleiðing á økinum.

### 3.9.4. Vegleiðing í sambandi við at endurnýta gamla samskiftistøkni

Í seinastuni hava fyritøkur lýst við at taka inn gamla samskiftistøkni, so sum fartelefonir, teldur o.a. til endurnýtslu.

Í hesum sambandi er tað sera týdningarmikið, at upplýsingarnar verða strikaðar, áðrenn tólini verða brúkt til endurnýtslu.

Dátueftirlitið skal gera vart við, at vanliga kunnu dátur ikki strikast effektivt frá einum harðdiski, USB-lykli ella fartelefon (minni-skorti) við at brúka standardfunkur, sum eru til taks í eini stýriskipan. Tú kanst soleiðis ikki strika dátur effektivt við at strika eina fílu í Windows og síðani tøma pappírskurvina. Dátur verða heldur ikki strikaðar effektivt við eini forsniðan (formatering).

Reglur um kt-trygd eru ásettar í trygdar-kunngerðini (kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003), og sambært hesum reglum skulu dátuábyrgdarar m.a. tryggja, at persónsupp-lýsingar ikki koma óviðkomandi í hendur.

Tá tólini ikki skulu nýtast meir, er eingin ivi um, at tryggasti mátin er fysisk oyðilegging, soleiðis at tryggjað verður, at upplýsingar ikki koma óviðkomandi í hendur.

Tá útgerðin verður latin til endurnýtslu, mælir Dátueftirlitið til at hava hesar reglur í huga:

- Tá goymslumiðlar og útgerð, sum innihalda persónsupplýsingar, skulu burturbeinast, skulu hesir oyðileggjast ella avmagnetiserast, so ikki er møguligt at lesa innihaldið
- Um dátuábyrgdari heldur enn at oyðileggja goymslumiðlar, letur hesar frá sær til endurnýtslu, skulu goymdar upplýsingar frammanundan strikast effektivt við yvir-skriving
- Dátueftirlitið mælir til, at tá ið tilfar verður yvirskrivað, verður nýtt ein av teimum spesialskráum, sum eru ætlaðar til enda-málið, og sum yvirskriva dátur fleiri ferðir sambært góðkendari tøknilýsing (t.d. DOD 5220.22-M).

**Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum eru nógvar og málsviðgerðin er fjøltáttað.**

# 4 Ávís útvald mál í 2010



## 4.1. YMISK MÁL

Í hesum partinum av ársfrágreiðingini verður greitt nærri frá einstøkum útvaldum málum í 2010.

### 4.1.1. Innlit í logg í THS-skipanini

Dátueftirlitið hevur viðgjørt ein fyrispurning frá Heilsumálaráðnum viðvíkjandi innliti í logg. Støða skuldi takast til, um heimild er í persónsupplýsingarlógini til, at persónur kann krevja innlit í logg í THS-skipanini, soleiðis at viðkomandi fær eina útskrift yvir allar persónar, sum hava verið inni á sjúklingajournalini hjá viðkomandi. Ikki bert tey, sum hava lagt upplýsingar inn á journalina, men eisini, hvør hevur verið inni og hugt at journalini.

Dátueftirlitið metti spurningin vera prinsipiellan, og hevur spurningurin tí verið lagdur fyri Dátuáðið til endaliga støðutakan. Niðurstøðan hjá Dátuáðnum var, at tað er ikki heimild í persónsupplýsingarlógini til at geva innlit í loggútskriftir í THS.

Dátuáðið metti ikki, at heimildin í § 19 er nóg breið til at geva heimild til innlit í loggupplýsingar, sum umbiðið í hesum føri. Tí hóast viðkomandi hevur rætt til at fáa innlit í, hvaðani persónsupplýsingarnar eru útvegaðar, so merkir hetta tó ikki, at viðkomandi kann krevja at fáa avrit av øllum logginum.

§ 19 stk. 1 nr. 4 viðger bert, hvørjar upplýsingar ein kann krevja um seg sjálvan. Dátueftirlitið metir, at tað er sera ivasamt um logg-upplýsingar, sum vísa, hvør persónur hevur verið inni á eini journal, kunnu sigast at vera "upplýsingar um ein sjálvan".

Dátuáðið metti hinvegin, at tørvur er á eini áseting um, at sjúklingar skulu fáa innlit í egnar loggupplýsingar í heilsuverkinum. Mett varð, at ein tílík áseting skal vera í serlóggávu og ikki í persónsupplýsingarlógini.

Ráðið var samt um at senda skriv til Løgmansskrivstovuna, Innlendismálaráðið og Heilsumálaráðið og heita á politiska myndugleikan um at fáa hesi viðurskifti lógarregulerað.



### 4.1.2. Tollvaldið – atgongd til vakmyndatólsupptøkur

Dátueftirlitið fekk fyrispurning frá Taks um møguleika fyri at síggja upptøkur hjá Vága Floghavn. Talan var um eitt ítøkiligt mál, har ein maður var komin í land við Norrønu og síðan farin av landinum aftur við Atlantsflogi sama dag. Illgruni var um, at maðurin hevði rúsevni uppi á sær, sum hann hevði selt í Føroyum. Roknað varð við, at maðurin kemur aftur til landið í somu ørindum, og tískil ynskti Tollvaldið at síggja vakmyndatólsupptøkur, sum Vága Floghavn hevur av manninum. Hetta varð noktað, av tí at Tollvaldið ikki kann vísa til dómsúrskurð.

Vága Floghavn vísti á, at um felagið kann vera við og hjálpa til at fyribyrgja og steðga rúsevnissmugling, so hevði felagið einki ímóti at lata Tollvaldinum vakmyndatólsupptøkur.

Dátueftirlitið gav loyvi til, at starvsfólk hjá Taks, kunnu fáa atgongd til at síggja vakmyndatólsupptøkur hjá Vága Floghavn í serligum føri.

Í hesum sambandi skal Vága Floghavn – møguliga saman við Taks – gera mannagongd fyri, hvussu hetta skal skipast. Mannagongd skal í minsta lagi gerast fyri:

- Í hvørjum føri mett verður, at tað er sakligt og neyðugt, at Tollvaldið fær atgongd til upptøkurnar
- Hvørji starvsfólk/starvsbólkar hjá Taks skulu hava atgongd
- At starvsfólk hjá Vága Floghavn eru til staðar tá hugt verður
- At tað bert er atgongd til upptøkurnar í hølunum hjá Vága Floghavn.

Vága Floghavn hevur tann 20. oktober 2010 sent Dátueftirlitinum mannagongd fyri vakmyndatólsupptøkur hjá Vága Floghavn. Dátueftirlitið hevur ongar viðmerkingar til hesa mannagongd.



### 4.1.3. P- tal prentast á heilsutrygdarkort

Dátueftirlitið hevur svarað fyrispurningi frá Heilsutrygd viðvíkjandi heilsutrygdarkortinum. Spurt varð m.a. um Heilsutrygd kundi prenta p-talið hjá persónum á eitt heilsutrygdarkort, ella um hetta kundi gerast í bronglaðum formi á magnetstrimmilin á heilsutrygdarkortinum.

Dátueftirlitið svaraði, at sambært § 11 í persónsupplýsingarlógini kunnu almennir myndugleikar viðgera upplýsingar um persónstalið til eintýdda eyðmerking ella sum skránummar. Henda áseting loyvir almennum myndugleikum at brúka p-talið í ávísan mun, serliga til innanhýsis nýtslu. Dátueftirlitið metti ikki, at tað var heimild í persónsupplýsingarlógini til at prenta p-talið á heilsutrygdarkortið.

Upplýsingar á heilsutrygdarpróvnum, sum spurt verður um, er regulerað í serlóg (Løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd). Dátueftirlitið mælti tí til, at landsstýrismaðurin í heilsumálum ásetti nærri reglur í kunngerð um útsjónd, nýtslu, innihald, útflýggjan og afturtøku av heilsutrygdarpróvnum, sum ásett í § 2 stk. 2 í lóg um almenna heilsutrygd. Víst varð eisini á, at hetta var gjørt í Danmark.



### 4.1.4. Sms-boð

Dátueftirlitið hevur svarað einum fyrispurningi, har spurt varð um loyvt er privatum fyritøkum at senda privatfólkum sms-boð, sum tey ikki hava biðið um.

Talan var um dømi, har fysioterapeutur hevði mint á eina tíð til viðgerð, og at ein bilverkstaður hevði sagt frá, at bilurin hjá viðkomandi var liðugur at avheinta.

Í svarinum til viðkomandi metti Dátueftirlitið, at fysioterapeuturin og bilverkstaðurin hava heimild í § 9, stk. 1, nr. 1 í persónsupplýsingarlógini at senda hesi sms-boð. SMS-boðini eru at skilja sum ein áminning um eina tíð ella avtalu, sum viðkomandi sjálvur hevur biðið um, og ongar viðkvæmar upplýsingar eru í sms-boðunum.

§ 9, stk. 1, nr. 1 í persónsupplýsingarlógini er soljóðandi, *" Persónsupplýsingar kunnu bert viðgerast, um tann skrásetti hevur givið sítt samtykki, um viðgerðin er heimilað í lóg, ella um viðgerðin er neyðug til tess , 1) at halda avtalu, sum gjørd er við skrásetta, ella sum skrásetti er partur í, ella fyri at gera tað, sum neyðugt er, fyri at slík avtala eftir áheitan frá skrásetta kann fáast í lag."*

Í hesum føri viga áhugamálini hjá fyritøkuni at skipa og leggja til rættis arbeiðið tyngri enn verja av privatlívinum hjá viðkomandi.

Dátueftirlitið hevur í svarinum lagt dent á, at viðkomandi sjálvur hevur biðið um avtaluna, sum mint verður á, at viðkomandi sjálvur hevur givið telefonnummarið ella tað er alment atkomuligt, og at í sms boðunum eru ikki viðkvæmar persóns-upplýsingar.

### 4.1.5. Kæra um myndir frá Ole Ivars tiltakinum í høllini á Hálsi tann 2. februar 2010

Dáturáðið hevur tikið avgerð í einum máli, har kært varð um myndir frá dansitiltakinum á Hálsi við Ole Ivars tann 6. februar 2010. Kært varð um at eingin kunning var um, at tiltakið skuldi takast upp, og at myndir frá dansitiltakinum skuldu leggjast á heimasíðuna hjá Kringvarpi Føroya.

Málið varð aftur lagt fyri Dáturáðið, har støða fyrst og fremst skuldi takast til, um talan er um viðgerð við einans journalistiskum endamáli ella ikki. Um mett varð, at talan er um viðgerð við einans journalistiskum endamáli, so er viðgerðin ikki fevnd av viðgerðarreglunum í persónsupplýsingarlógini.

Niðurstøðan hjá Dáturáðnum var, at mett varð at tiltakið og myndirnar frá tiltakinum komu undir § 6 í persónsupplýsingarlógini, av tí at talan var um journalistiskt endamál, og vísti Dáturáðið tí málinum frá sær. Mett varð, at rætti myndugleikin møguliga er Fjølmiðlanevndin. Møguliga kann málið eisini vera fevnt av § 264 a í revsilógini, sum hevur áseting um myndatøku.



### 4.1.6. Lønarseðlar við telduposti

Dátueftirlitið hevur í 2010 fingið fleiri fyrispurningar um at senda lønarseðlar við telduposti.

Spurt verður, um tað er loyvt at senda ókrypteraðar lønarseðlar við telduposti, av tí at á lønarseðlunum standa bæði p-tal og konto nr.

Dátueftirlitið hevur svarað, at sambært § 11, stk. 3 í Trygdarkunngerðini (kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum) skulu viðkvæmar persónsupplýsingar, sum verða sendar umvegis internet, krypterast.

Kontonummar og p-tal eru ikka at meta sum viðkvæmar persónsupplýsingar, og tað er sostatt ikki eitt lógarásett krav, at hesar upplýsingar verða krypteraðar, tá tær verða sendar umvegis internetið. Hinvegin metir Dátueftirlitið, at talan er um upplýsingar, sum ikki skulu koma í hendurnar á óviðkomandi, tí at stórur skaði kann standast av hesum.

Dátueftirlitið hevur tí mælt til, at upplýsingar um kontonummur og p-tal verða krypteraðar, tá tær verða sendar starvsfólkunum, og upplýsingarnar fara út um netið hjá viðkomandi arbeiðsgevara.



Somuleiðis hevur Dátueftirlitið fingið upplýst, at yrkisfelag hjá starvsfólkum verður upplýst á summum lønarseðlum, og sambært § 2 stk. 9 í persónsupplýsingarlógini er yrkisfelagsligt tilknýti at meta sum viðkvæmar upplýsingar, og tískil skulu hesar upplýsingar á lønarseðlunum altíð verða krypteraðar, um tær verða sendar starvsfólki við telduposti.



### 4.1.7. Streama gudstænastur á internetinum

Uni Næs, dómpróstur, hevur vegna Christianskirkjuna í Klaksvík biðið um loyvi til at senda guðstænasturnar via internetið. Ætlanin er at senda livemyndir og ljóð við at seta nøkur webcam upp í kirkjuni, sum síðan verða víst umvegis internetið (streamað). Ætlanin er so, at gudstænastan verður send á einum brovsara, sum so er møguleiki at logga seg inn á, m.a. via Norðlýsið.fo, Portalin.fo o.a.

Fyri vevmyndatól (Webcam) eru reglurnar, at myndirnar kunnu leggjast á internetið, um so er, at persónar ikki kunnu kennast aftur á upptøkunum. Um so er, at fólk kunnu kennast aftur, so krevst nágreiniligt samtykki frá teimum, sum eru á upptøkunum, umframt at viðgerðin skal fráboðast Dátueftirlitinum á serligum oyðublaði. Dátueftirlitið viðger síðan fráboðanina og metir um, um tað er í lagi, at kirkjan streamar hesar upptøkur.

Dátueftirlitið metir, at tað kann vera skerjandi fyri persónliga frælsið hjá teimum, sum eru í kirkju, at verða filmað hvønn sunnudag, og metir Dátueftirlitið tískil, at fyrilitini fyri kirkjugangarunum viga tyngri enn ætlanin hjá kirkjuni at filma, jvb. § 9 stk. 1, nr. 6 í persónsupplýsingarlógini. Tað er tískil týdningarmikið, at kirkjufólkið ikki verður filmað, soleiðis at tey kunnu kennast aftur.

Hinvegin hevði Dátueftirlitið mett tað vera í lagi at streama gudstænastuna, um bert starvsfólk í kirkjuni, tvs. prestur, deknur, klokkari, urguspælari og møguliga onnur kunnu kennast aftur á upptøkunum. Sum nevnt omanfyri, krevst eitt nágreiniligt samtykki frá starvsfólkunum umframt at viðgerðin skal fráboðast Dátueftirlitinum á serligum oyðiblaði.



### 4.1.8. Peningastovnar flyta til SDC

Fyrst í mai 2010 hevði Dátueftirlitið avgreitt allar fráboðanir hjá peningastovnunum um at flyta datasentralin frá Elektron til Skandinavisk Data Center (SDC). Eik, Føroya Banki, Suðuroyar Sparikassi og Norðoya Sparikassi fingu boð frá Dátueftirlitinum um, at fráboðanirnar um at flyta dátasentralin til SDC vóru nøktandi.

Peningastovnarnir fráboðaðu flytingina á sumri 2009, men tað hevur tikið tíð at fáa øll viðurskifti í rætt lag. Dátueftirlitið hevur sambært persónsupplýsingarlógini kravt, at nakrar serligar ásetingar skulu vera í avtalunum um viðurskiftini millum partarnar, og tað er serliga hetta, sum hevur gjørt, at málið hevur tikið langa tíð.

Víst verður eisini til pkt. 4.2.1.

### 4.1.9. Íslendskt felag kappast við PBS

Dátueftirlitið hevur svarað einum fyrispurningi frá einum íslendskum felag, Valitor, sum hevur ætlanir um at koma inn á føroyska marknaðin at kappast við PBS. Valitor ynskir at bjóða føroyskum handlum lægri prísir á

Ávís útvald mál í 2010

korttransaktiónum og spurdi í tí samband, um nakað loyvi skuldi fáast frá Dátueftirlitinum í hesum sambandi.

Út frá frágreiðingunum frá Valitor, metti Dátueftirlitið ikki, at felagið skuldi hava loyvi til viðgerð av persónsupplýsingum.



### 4.1.10. Manntal

Í samband við, at manntal verður hildið í 2011 og ein royndarteljing var í 2010, hevur Dátueftirlitið havt fund og verið í tøttum samskifti við Manntal verkætlanina. Dátueftirlitið hevur m.a. spurt um trygdina, og hvat úrslitið av royndarteljingini skal brúkast til. Manntal hevur greitt frá um trygdina og víst á, at eingin ivi skal vera um, at eitt manntal hevur bara hagtøl sum endamál. Manntalið má ikki brúkast at savna inn tilfar, sum kann fremja ávís politisk sjónarmið ella stuðla ávísum málum ella áhugamálum.

Í 2011 verður lógaruppskot um manntal lagt fyri Løgtingið og fylgir Dátueftirlitið gongdini í málinum.

### 4.1.11. Upptøka av undirvísing í skúlatíð

Dátueftirlitið hevur svarað fyrispurningi um, hvørjar reglur eru fyri upptøku av undirvísing í fólkaskúlanum uttan loyvi frá lærarum ella foreldrum. Talan var í hesum føri um eitt starvsfólk, sum tók upp.

Tá talan er um upptøku av ljóði, har røddirnar kunnu kennast aftur, er talan um viðgerð av persónsupplýsingum.

Í § 8 í persónsupplýsingarlógini eru meginreglur fyri viðgerð av persónsupplýsingum. Í greinini er millum annað ásett, at viðgerðin skal vera saklig, neyðug og viðkomandi. Harafturat krevst ein heimild til at viðgera persónsupplýsingar eftir § 9. Út frá spurninginum metti Dátueftirlitið tað vera torført at svara ítøkiligt, tí tað er ringt at vita, hvat ið hoyrist av upptøkunum. Mest sannlíkt er tó, at tað krevst samtykki frá lærarunum og møguliga eisini frá foreldrunum.

### 4.1.12. Elektroniskt ALS-kort

Arbeiðsloysisskipanin kunnaði Dátueftirlitið um, at farið varð undir at menna eitt teldutøkt ALS-kort. Dátueftirlitið var á fundi við ALS og fekk tilfar til nærri gjøgnumgongd.

Dátueftirlitið vísti m.a. á, at tað er ógreitt, um Arbeiðsloysisskipanin er at rokna sum almennur ella privatur myndugleiki. Dátueftirlitið hevur fingið upplýst frá Vinnumálaráðnum, at ongin almenn útmelding er um hetta. Tað er ikki uppgávan hjá Dátueftirlitinum at meta um henda spurning.

Um so er, at Arbeiðsloysisskipanin er at rokna sum almennur myndugleiki, so kann ALS nýta persónstalið til eyðmerking ella sum skránummar. Er Arbeiðsloysisskipanin hinvegin at rokna sum privatur myndugleiki, krevst tað serstøk lógarheimild ella samtykki frá tí skrásetta til at brúka persónstalið. Viðvíkjandi samtykki, so kann hetta t.d. gerast, við at skrásetti á somu skermmynd krossar av, at hann samtykkir til, at persónstalið verður brúkt ísv. skráseting ella eyðmerking.

Dátueftirlitið vísti eisini á, at talgilda ALS-kortið setir krøv til kt-trygdina hjá ALS, og er tað Dátueftirlitið, sum hevur eftirlit við, at ALS heldur krøvini í trygdarkunngerðini, har krøv m.a. eru til innaneftirlit á stovninum.





### 4.1.13. Krypteraðir mailar

Ljósmøðurnar hava sett fyrispurning, um tað er í lagi at senda føðifráboðanir til heilsusystrarnar við krypteraðum telduposti í staðin fyri við posti.

Sambært § 11, stk. 3 í Trygdarkunngerðini skulu viðkvæmar persónsupplýsingar, sum verða sendar umvegis internet, krypterast. Um so er, at upplýsingarnar á eini føðifráboðan eru viðkvæmar, so skulu tær krypterast, tá tær verða sendar umvegis teldupost.

Viðkvæmar persónsupplýsingar eru sambært § 2, nr. 9 í persónsupplýsingarlógini hesar upplýsingar: *"Upplýsingar um lit og ættarslag, um átrúnaðarliga, heimsspekiliga ella politiska sannføring, um revsiverd og kynslig viðurskifti, heilsustøðu, yrkisfelagsligt tilknýti, munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti."*

Upplýsingar um p-tal eru ikka at meta sum viðkvæmar persónsupplýsingar, og tað er sostatt ikki eitt lógarásett krav, at hesar upplýsingar verða krypteraðar, tá tær verða sendar umvegis internet. Hinvegin metir Dátueftirlitið, at talan er um upplýsingar, sum ikki skulu koma í hendurnar á óviðkomandi, tí um hetta hendir, kann stórur skaði standast av hesum, og Dátueftirlitið vil tí mæla til, at upplýsingar um p-tal verða krypteraðar, tá tær verða sendar við telduposti.

Mett verður at tann krypteringsháttur, sum víst verður til, nøktar krøvini til kryptering, sum persónsupplýsingarlógin ásetir.



### 4.1.14. Skráseting á FaroeDating

Dátueftirlitið hevur viðgjørt eina kæru um skeiva skráseting, har kærarin var skrásettur í FaroeDating uttan at hava biðið um tað.

Dátueftirlitið tók málið upp við FaroeDating og vísti á, at at tað er skyldan hjá einum dátuábyrgdara at hava mannagongdir, sum tryggja, at skipanir eru tryggar og álítandi, soleiðis at ikki ber til ella er trupult at skráseta persónar av órøttum, og at tað somuleiðis er skyldan hjá dátuábyrgdaranum at strika órættar upplýsingar um skrásettar persónar. Víst varð í hesum sambandi til § 27 í persónsupplýsingarlógini.

FaroeDating greiddi frá, at mannagongdin fyri at skráseta seg á FaroeDating er, at øll kunnu skráseta seg. Hvørki navn ella teldupostur skal váttast av FaroeDating.

Dátueftirlitið fekk váttan frá FaroeDating um, at allar upplýsingarnar viðvíkjandi kæraranum á www.faroedating.fo vóru strikaðar og gjørdi tískil ikki meira við hendan partin av málinum.

Spurningurin um skeiva skráseting á netinum hevur síðan givið Dátueftirlitinum høvi til at taka upp samskifti við FaroeDating um trygd á netsíðuni.

Viðvíkjandi mannagongdunum, tá fólk verða skrásett í FaroeDating.fo, hevur Dátueftirlitið mett, at tað er ivasamt, um hendan mannagongd hjá FaroeDating er nøktandi í mun til krøvini í løggávuni á økinum. Dátueftirlitið heitti tí á FaroeDating um at umhugsa, hvørji

Ávís útvald mál í 2010


010101

tiltøk kundu setast í verk fyri at forða fyri ella at minka um vandan fyri, at persónar av órøttum verða skrásettir í FaroeDating.

Dátueftirlitið kom við uppskoti um, at ein loysn kundi møguliga verið, at brúkararnir skuldu innrita seg fyrstu ferð við egnum navni og bústaði, soleiðis at FaroeDating hevur upplýsingarnar um brúkararnar, sum tó kunnu verða dulnevndir á síðunum, og at profilurin ikki varð aktiveraður, fyrrenn brúkarin hevði góðkent teldupostin.

FaroeDating hevur síðan boðað Dátueftirlitinum frá, at í september/oktober 2010 verður farið undir at gera broytingar í telduskipanini, soleiðis at brúkarin skal vátta sín teldupost, tá viðkomandi skrásetir seg. Dátueftirlitið metir hetta vera nøktandi og ger ikki meira við málið.

### 4.1.15. Loyvi at upptaka øll kall á VHF kanal 16

Dátueftirlitið hevur fingið skriv frá Fjarskiftiseftirlitinum, har biðið verður um viðmerkingar til, at Tórshavnar Havn hevur søkt Fjarskiftiseftirlitið um loyvi at upptaka øll kall á VHF kanal 16.

Sum grundgeving hevur Tórshavnar Havn upplýst, at aftaná arbeiðstíð er bert ein maður á vakt, og skal hann røkja allar havnirnar í kommununi. Í økjum í kommununi eru vánalig ella eingi hoyrilíkindir, soleiðis at um tað verður kallað á Tórshavnar Havn á kanal 16 frá skipum, sum søkja havn, so verða hesi uppkall ikki svarað, av tí at vakthavandi ikki hoyrir hesi uppkall. Tískil vil Tórshavnar Havn hava møguleika at avlurta kanal 16, tá vakthavandi er komin aftur á skrivstovuna.

Dátueftirlitið vísti á § 8 í persónsupplýsingarlógini, har tað m.a. er ásett, at upplýsingar mugu ikki goymast longur enn neyðugt, og tað skal vera eitt sakligt atlit sum ger, at upplýsingarnar kunnu goymast ella í hesum ítøkiliga førinum upptakast.

Dátueftirlitið metir, at Fjarskiftiseftirlitið sum serkunnleiki á økinum, møguliga saman við Tórshavnar Havn, má meta um og koma fram til ta loysn, sum tryggjar at vandastødd fáa neyðugu hjálpina.

Fjarskiftiseftirlitið má tískil velja ta loysnina, sum tænir hesum endamáli og samstundis gongur sum minst útyvir tey skrásettu.



### 4.1.16. Ikki heimild at útvega persónstøl frá Gjaldstovuni uttan samtykki

Dáturáðið hevur tikið avgerð um, at tað ikki er heimild í persónsupplýsingarlógini at víðarigeva persónstalið frá einum almennum myndugleika til eitt privat felag.

Í samband við, at Betri Pensjón hevur gjørt avtalu við Føroya Lærarafelag um, at allir limirnir í felagnum verða tryggjaðir hjá Betri Pensjón frá 1. januar 2010, hevur Betri Pensjón tørv á at skráseta persónstølini hjá øllum limunum í Føroya Lærarfelag.

Føroya Gjaldstova avgreiðir lønarviðurskiftini hjá lærarum, og Betri Pensjón heitti tí á Dátueftirlitið um at loyva Føroya Gjaldstovu at útflýggja Betri Pensjón ein lista við persónstølunum hjá lærarunum.

Tað er álagt í skattalógini, § 120 p, at tryggingarfeløg skulu lata persónstølini til TAKS. Men tað er ongin áseting í § 120 p um, hvørjum persónstølini skulu útvegast frá.

Dáturáðið metti ikki, at heimild var í § 11 í persónsupplýsingarlógini til, at Betri Pensjón kundi útvega persónstølini frá Gjaldstovuni uttan samtykki frá teimum skrásettu. Fyri at Gjaldstovan skal lata víðari persónstølini krevst, at skrásetti nágreiniliga hevur givið sítt samtykki til víðarigevingina.



### 4.1.17. Fyrispurningur um handfaring av barnaverndarmáli

Dátueftirlitið hevur viðgjørt ein fyrispurning um eitt barnaverndarmál, sum ein persónur ynskti strikað. Upplýst var, at ein persónur mótvegis barnaverndini hevði sett ákærur fram móti einum øðrum persóni, og at fráboðanin til barnaverndina var gjørd ónavngivin. Persónurin hevur tó ítøkiligan og grundaðan mistanka um, hvør tað er, sum hevur sett ákærurnar fram. Løgregla og barnavernd hava viðgjørt málið, og báðir myndugleikar meta, at talan er um fullkomiliga grundleysar ákærur.

Talan er um álvarsligar ákærur, og persónurin heldur tað vera skeivt og tyngjandi, at tað yvirhøvur er skrásett eitt mál um viðkomandi og børnini hjá viðkomandi hjá barnaverndini, tá bæði barnavernd og løgregla hava lagt til grund, at hetta eru fullkomiliga grundleysar ákærur.

Upplýst er, at barnaverndin hevur sagt, at tað ikki ber til at strika mál, sum eru skrásett.

Spurningurin er tískil, um myndugleikar hava loyvi til at varðveita tílík mál, tá tað vísir seg, at fráboðanir, ið eru innkomnar, eru ógrundaðar, og tá myndugleikin eisini hevur lagt hetta til grund.

Talan er um eitt øki, sum verður regulerað av fleiri ymiskum løggávum, og tað eru serliga persónsupplýsingarlógin og landsskjalasavnsløggávan, sum regulera hetta økið.

Sambært § 7 stk. 2 in fine í kunngerð nr. 117 frá 5. juli 1995 um almenn savnindi og virksemið hjá Føroya Landsskjalasavni er ásett, at journalskráir eiga í ongum førum at verða strikaðar, men eiga, tá hesar ikki longur verða nýttar í fyrisitingini, at verða avhendar Landsskjalasavninum.

Í § 5 í somu kunngerð er ásett, at Føroya Landsskjalasavn skal geva heimild til at vraka savnindi hjá stovnum. Tað er landsskjalavørðurin, sum ásetir nærri reglur um varðveiting og vraking av savnindum hjá almennum stovnum.

Sambært omanfyrinevndu ásetingum, er tað tískil ikki heimild til at strika málið.

Sambært § 8, stk. 1, nr. 6 í persónsupplýsingarlógini, hevur barnaverndin skyldu til at ansa eftir, at persónsupplýsingarnar eru beinar og verða nøktandi dagførdar. Um so er at talan er um skeivar ella villeiðandi upplýsingar, skulu upplýsingarnar rættast skjótast gjørligt. Hetta kann gerast, við at skriva eitt nýtt skjal við eini frágreiðing ella rættleiðing og leggja tað í málið.

Dátueftirlitið metti, at Landsskjalasavnsløggávan er ein serlóg, sum hevur eina serliga víðkaða heimild í samband við varðveitslu av skjølum. Dátueftirlitið vísti tó á, at trygdarkunngerðin og reglurnar í persónsupp-

Ávís útvald mál í 2010

lýsingarlógini annars eru galdandi við síðuna av Landsskjalasavnslóggávuni. Tað vil siga, at tað er Landsskjalasavnslóggávan, sum hevur serligar ásetingar um varðveitslu av skjølum, í meðan reglurnar í persónsupplýsingarlógini og trygdarkunngerðini í stóran mun áseta, á hvønn hátt upplýsingar skulu varðveitast á nóg tryggan hátt.

Dátueftirlitið legði í avgerðini dent á, at barnaverndin sum almennur myndugleiki sambært almennum fyrisitingarligum reglum, lóg um Landsskjalasavn o.a. hevur skyldu til at varðveita málsupplýsingar fyri at kunna skjalprógva málsgongdina.

## 4.1.18. Innanhýsis samskifti millum skúla og frítíðarskúla

Fyri at røkka málinum at arbeiða við trivnaðinum hjá barninum og at síggja barnið sum eina heild, sendi Frítíðarskúlin við Løgmannabreyt í Hoyvík, uppskot um orðing til váttan frá foreldrum um, at skúlin og frítíðarskúlin við Løgmannabreyt kunnu samskifta partanna millum um viðkvæm viðurskifti viðvíkjandi trivnaðinum hjá børnunum.

Tá talan er um viðgerð av viðkvæmum persónsupplýsingum, krevst loyvi frá Dátueftirlitinum. Tað er dátuábyrgdarin, sum skal søkja Dátueftirlitið um viðgerðarloyvi til viðgerð av viðkvæmum persónsupplýsingum. Tvs. at tað er hvør skúli/frítíðarskúli sær, sum skal søkja um loyvi.

Treytin fyri, at Frítíðarskúlin við Løgmannabreyt kann viðgera viðkvæmar upplýsingar er, at frítíðarskúlin lýkur allar treytirnar í § 8 og harafturat hevur eina heimild í § 9 og § 10 at vísa á.

Í § 8 í persónsupplýsingarlógini eru meginreglurnar fyri viðgerð av persónsupplýsingum ásettar. Hetta eru treytir, sum dátuábyrgdarin altíð skal lúka, tá persónsupplýsingar verða viðgjørdar. Í greinini verður millum annað ásett, at persónsupplýsingar bert skulu savnast saman til eitt nágreiniliga tilskilað endamál, sum er sakliga grundað í virksemi dátuábyrgdarans, og at seinni viðgerð skal samsvara hesum endamáli. Harafturat skulu persónsupplýsingar bert viðgerast, um tær eru viðkomandi og ikki fevna um meira enn krevst fyri at røkka endamálinum. Persónsupplýsingar skulu ikki verða nýttar til endamál, sum ikki samsvara upprunaliga endamálinum, uttan so at skrásetti hevur givið sítt samtykki.

Í § 9 í persónsupplýsingarlógini, er millum annað ásett, at persónsupplýsingar bert kunnu viðgerast, um tann skrásetti hevur givið sítt samtykki. Og sambært § 10 kunnu *viðkvæmar persónupplýsingar* millum annað viðgerast, um skrásetti hevur givið samtykki.

Dátueftirlitið vísti á, at tað eru strong krøv í persónsupplýsingarlógini til, nær eitt samtykki hevur gildi. Samtykkið skal vera so nágreiniligt, at ongin ivi skal vera um, at samtykkið er givið, hvørjum dátuábyrgdara samtykkið er givið, og hvørjar viðgerðir samtykkið er givið til. Kunnað skal eisini vera um samtykkið, soleiðis at tann samtykkjandi skal hava fingið so mikið av upplýsingum, at viðkomandi er fullgreitt vitandi um, hvat samtykkið fevnir um, herundir eisini fylgjurnar av tí. Samtykkið kann verða tikið aftur sbrt. § 29. Verður samtykkið tikið aftur, eigur viðgerðin, sum samtykkið varð givið til, at steðga.

Dátueftirlitið heitti á Frítíðarskúlan við Løgmannabreyt um at gera eitt nýtt uppskot til





váttan, har greitt verður nærri frá, nær og hví tað er neyðugt at fáa hesar upplýsingar. Tað skal eisini vísast á, at samtykkið er sjálvboðið, og at tað altíð kann takast aftur. Harafturat skal loyvi fáast frá Dátueftirlitinum.

## 4.1.19. Landsgrannskoðanin ynskir atgongd til skipanir hjá Almannastovuni

Í februar 2010 sendi Landsgrannskoðanin eina umbøn til Almannastovuna um at fáa atgongd til hesar skipanir, málsviðgeraskipanina ScanJour, útgjaldsskipanina VFS, umframt skipanina Discoverer, sum gevur møguleika at leita fram upplýsingar og hagtøl úr ScanJour og VFS. Umbønin snúði seg um atgongd til skipanirnar, tá starvsfólk hjá Landsgrannskoðanini eru á Almannastovuni, og í øðrum lagi at hesi starvsfólk fáa atgongd til skipanirnar frá hølunum hjá Landsgrannskoðanini.

Almannastovan sendi umbønina frá Landsgrannskoðanini til Dátueftirlitið og bað Dátueftirlitið um at taka støðu til, hvør lóg gongur fram um, løgtingslóg um grannskoðan av landsroknskapinum, ella løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum. Harumframt at taka støðu til, um tað við atliti at persónsupplýsingarlógini er munur á, hvussu umbønin skal viðgerast, um atgongd til skipanirnar verður givin ávísum starvsfólki hjá Landsgrannskoðanini:

- tá tey eru í hølunum hjá Almannastovuni
- online, so tey kunnu arbeiða í hølunum hjá Landsgrannskoðanini
- sum kopi av skipanunum, sum verður latið Landsgrannskoðanini at arbeiða við í hølunum hjá Landsgrannskoðanini.

Dáturáðið kom til ta niðurstøðan at mett varð, at Landsgrannskoðanin hevur breiða heimild at krevja upplýsingar og skjøl frá Almannastovuni sbrt. § 21 í Ll. um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. Tað er ásett í § 21 í lóg um landsgrannskoðan, at Landsgrannskoðanin kann til eina og hvørja tíð grannskoða og gjøgnumganga roknskapir á staðnum, har roknskaparhaldið fer fram, ella har tað neyðuga tilfarið annars finst.

Hinvegin skulu bæði Almannastovan og Landsgrannskoðanin halda ásetingarnar í persónsupplýsingarlógini og í trygdarkunngerðini, tá persónsupplýsingar verða viðgjørdar.

Dátueftirlitið metir, at tað í fyrstu syftu er Almannastovan, sum má meta um, á hvønn hátt grannskoðanin kann fara fram á ein tryggan hátt við atliti til krøvini í persónsupplýsingarlógini og trygdarkunngerðini. Við atliti at persónsupplýsingarlógini og trygdarkrøvunum í trygdarkunngerðini, má Almannastovan meta um, hvørt tað er heimild í lóg um landsgrannskoðan at krevja atgongd til skipanirnar frá hølunum hjá Landsgrannskoðanini, bæði tá tað kemur til avrit av skipanum ella sum online atgongd.

Dátueftirlitið skal gera vart við, at tað er ábyrgdin hjá Almannastovuni við trygdartiltøkum at tryggja, at Landsgrannskoðanin fær atgongd til tær upplýsingar og tey skjøl, sum eru neyðug fyri, at arbeiðsuppgávan kann fremjast, men at trygdartiltøk eisini skulu vera, sum forða ikki loyvdari nýtslu.

At enda skal Dátueftirlitið viðmerkja, at metir Almannastovan at on-line atgongd á Almannastovuni ella í hølunum hjá Landsgrannskoðanini ikki kann gevast á tryggan

hátt, so er tað skyldan hjá Almannastovuni at bera so í bandi, at neyðugar broytingar verða gjørdar, áðrenn upplýsingarnar verða útflýggjaðar.

### 4.1.20. Privatpersónur ynskir upplýsingar strikaðar á heimasíðuni www.logting.fo

Dátueftirlitið fekk við ársbyrjan eina áheitan frá einum privatpersóni um, at tá viðkomandi persónur verður googlaður (skrivað navnið í leitifelti á www.google.dk) koma upplýsingar fram, sum skaða umdømi hjá viðkomandi persóni í útlandinum og hava negativa ávirkan á møguleikan hjá viðkomandi at virka í útlandinum, har persónurin hevur ein part av sínum vinnuvirksemi.

Upplýsingarnar sum koma fram á google stava frá heimasíðuni www.logting.fo, sum Løgtingsskrivstovan varðar av. Dátueftirlitið vísti í brævi til Løgtingsskrivstovuna á, at tað at almannakunngera upplýsingar á internetinum verður mett sum at lata víðari upplýsingar, og skal henda viðgerð tí viðgerast eftir reglunum í §§ 8-9 í persónsupplýsingarlógini, av tí at mett verður, at tað ikki eru viðkvæmar upplýsingar, sum málið snýr seg um. Dátueftirlitið vísti á, at treytin fyri at Løgtingið kann leggja skjalið út á internetið er, at Løgtingið lýkur allar treytirnar í § 8 og hevur eina heimild í § 9 at vísa á.

Løgtingið vísti á tingskipanina sum heimild fyri at leggja nevndu upplýsingar á heimasíðuna og metti ikki, at viðurskiftini eru fevnd av persónsupplýsingarlógini.

Málið varð lagt fyri Dáturáðið til støðutakan, og ráðið metti yvirskipað, at hóast formansskapurin í Løgtinginum hevur víst á, at tað er heimild í Tingskipanini til at leggja skjalið út á heimasíðuna, so má tingskipanin hava fyrilit fyri aðrari lóggávu, sum Løgtingið hevur samtykt.

Í § 16 í stýrisskipanarlógini1 er ásett, at Løgtingið sjálvt ásetir tingskipan sína, sum inniheldur nærri reglur um málsgongd og skilhald. Við heimild í § 16 í stýrisskipanarlógini, ásetir § 83 í tingskipanini, at Løgtingstíðindi eru tøk á teldumiðli og eftir § 83, stk. 3, VII, eru innkomin skriv til tingið partur av Løgtingstíðindum.

Dátueftirlitið metir, at lógarheimildin í § 16 í stýrisskipanarlógini er so breið og ógreitt orðað, at spurnartekin kann setast við, um Løgtingið hevur heimild til at avgera, at øll innkomin skriv skulu leggjast á heimasíðuna hjá Løgtinginum. Dátueftirlitið metir, at tað í øllum føri, skal ein kvalificering/sortering gerast í hvørjum einstøkum føri, har mett verður, um áhugamálini hjá Løgtinginum at almannakunngera á netinum, viga tyngri enn fyrilitini fyri skrásetta, sbrt. § 9 stk. 1, nr. 6 í persónsupplýsingarlógini.

Við atliti at tí ívasomu lógarheimildini sæð í mun til persónsverndina í hesum máli, fer Dátueftirlitið at heita á formannskapin í Løgtinginum, um at lata ivan av omanfyri nevndu lógarheimild í hesum føri koma borgaranum til góðar og taka umrødda skriv av heimasíðuni skjótast gjørligt.

Um Løgtingið ikki vil ganga hesi áheitan á møti, vil Dátueftirlitið heita á Løgtingið um, í hvussu so er at navnloyna nevnda skriv, so at ongar persónsupplýsingar eru í skrivinum. Henda mannagongd verður m.a. nýtt av Løgtingsins Umboðsmanni, tá avgerðir verðar lagdar á heimasíðuna www.lum.fo. Dátueftirlitið metir, at navnloyning kann gerast í hesum ítøkiliga førinum við at strika navnið " " sum stendir eftir " ".

Somuleiðis vil Dátueftirlitið heita á Løgtingið um at umhugsa at broyta mannagongdirnar frameftir, tá Løgtingið leggur persónsupplýsingar á heimasíðu sína, so at samsvar er millum reglurnar í persónsupplýsingarlógini, sum Løgtingið samtykti í 2001, og reglurnar í Tingskipanini.

Stutt eftir hetta varð umrødda skjal tikið av heimasíðuni www.logting.fo og Dátueftirlitið gjørdi ikki meira við málið.

## 4.2. MÁL TIKIN UPP AV EGNUM ÁVUM

Sambært § 37, stk. 1, nr. 1 í persónsupplýsingarlógini hevur Dátueftirlitið heimild at taka mál upp av egnum ávum, og í 2010 var eitt av hesum málum, nýggja kt-skipanin hjá peningastovnunum.

### 4.2.1. Nýggja kt-skipanin hjá peningastovnunum

Dátueftirlitið metti fyrst í mai, at nýggja kt-skipanin hjá peningastovnunum var nøktandi, tá peningastovnarnir vátta, at trygdin lýkur treytirnar í persónsupplýsingarlóggávuni.

Tá komið er longur út í mai mánaða gerst Dátueftirlitið umvegis fjølmiðlarnar varugt við ymiskar trupulleikar í sambandi við, at nýggja kt-skipanin hjá peningastovnunum er tikin í nýtslu. Dátueftirlitð fekk tá eisini kunning um, at p-tal varð printað á kvittanina, tá peningur varð tikin út úr sjálvtøkuni.

Ávís útvald mál í 2010

Dátueftirlitið bað í skrivi dagfest 19. mai 2010 peningastovnarnar um frágreiðing um, hvørt nevndu hendingar vóru eindømi ella talan var um generellar hendingar, og hvørji stig peningastovnarnir fóru at taka til tess at fáa viðurskiftini í rættlag.

Í skrivi frá peningastovnunum fyrst í juni mánaða verður upplýst, at í sambandi við lønarútgjaldingar, sum eru gjørdar í tíðarskeiðnum 12. mai til 19. mai 2010, er p-tal av misgáum komið á bókingartekstin hjá kundanum. Talan er um íalt 7669 bókingar fyri allar føroysku peningastovnarnar. Upplýst er, at feilurin varð rættaður tann 20. mai 2010, soleiðis at einki p-tal er at síggja á bókingartekstinum hjá kundanum á bókingum eftir hetta tíðarskeiðið.

Somuleiðis gera peningastovnarnir vart við, at p-talið bert er komið til kundan sjálvan, og ikki til onnur, og tískil verður ikki mett, at hendingin hevur verið atvold til, at óviðkomandi hava haft atgongd til kundans p-tal.

Dátueftirlitið tekur svarið viðvíkjandi p-tølum á sjálvgreiðslukvittanum til eftirtektar og ger ikki meira við hendan partin av málinum.

**Fleiri ivasom viðurskifti viðvíkjani trygdini**
Eftirfylgjandi hevur Dátueftirlitið fingið fleiri fráboðanir frá viðskiftafólki hjá peningastovninum, sum hava gjørt vart við ymisk ivamál um trygdina í nýggju skipanini. Dátueftirlitið bað um eina frágreiðing í málinum, har gjølla skuldi greiðast frá, um/hvussu persónsupplýsingar ferðast millum peningastovnar, og um starvsfólk í einum peningastovni hava atgongd til upplýsingar hjá kundum í øðrum peningastovnum.

Eisini hava fleiri viðskiftafólk víst sína ónøgd við, at kontonummarið hjá kundanum er á kvittanini úr sjálvtøkuni. Víst verður á, at ofta verða kvittanirnar gloymdar ella koyrdar í ruskílætið á staðnum, og tískil er tað lætt hjá øðrum at fáa atgongd til kontoupplýsingar.

Allir peningastovnarnir góvu í august mánaða Dátueftirlitinum nærri frágreiðing um viðurskiftini og trygdina í nýggju KT-skipanini.

Peningastovnarnir greiddu m.a. frá, at vatntøtt skottir eru millum skipanirnar hjá peningastovnunum, soleiðis at starvsfólk í einum peningastovni sjálvandi ikki høvdu atgongd til upplýsingar hjá kundum í øðrum peningastovnum.

Upplýst varð eisini, at sjálvtøkuskipanin var soleiðis háttað, at kontonummarið varð útskrivað á kvittanina. Kunnað varð tó um, at peningastovnarnir arbeiddu við at gera broytingar soleiðis, at kontonummar, ið hoyrir til kortið, ikki verður prentað á kvittanina.

Dátueftirlitið hevur tikið svarini til eftirtektar og ger ikki meira við málið.

Tað sum eyðkennir londini rundanum okkum, tá talan er um vernd av persónsupplýsingum, er eitt víttfevnandi altjóða samstarv.

# 5 Altjóða samstarv

Tað sum eyðkennir londini rundanum okkum, tá talan er um vernd av persónsupplýsingum, er eitt víttfevnandi altjóða samstarv. Hetta samstarv hevur stóran týdning og er neyðugt, orsakað av at persónsupplýsingar ofta verða fluttar um landamørk.

Flestu grannalondini hava eins og Føroyar eina persónsupplýsingarlóg, ið er grundað á ES-fyriskipan 95/46EF um verju av likamligum persónum við viðgerð av persónsupplýsingum og frítt skifti av persónsupplýsingum millum lond. Meginreglan í hesi fyriskipan er, at viðgerð skal vera í samsvari við grundleggjandi persónsverndaratlit sum persónsfrælsi og heimafrið hins einstaka. Eisini skal viðgerð av persónsupplýsingum virka til frama fyri øktari vælveru hjá tí einstaka og øktum samhandli landanna millum.

Tá tað snýr seg um at flyta persónsupplýsingar millum lond, býtir ES-löggávan londini upp í limalond og triðjalond. Persónsupplýsingar kunnu flytast millum limalondini í Evropasamveldinum, tí hesi hava somu trygdarstig. Snýr tað seg hinvegin um triðjalond, so hevur ES-nevndin býtt hesi lond upp í trygg og ótrygg triðjalond. Trygg triðjalond eru lond, sum kunnu tryggja eins góða trygd fyri persónsupplýsingum, sum ES-londini gera, og á heimasíðuni hjá ES-nevndini er ein listi yvir triðjalond, sum eru góðkend sum trygg triðjalond. Rættiliga strangar treytir eru hinvegin fyri flutningi av upplýsingum til triðjalond, sum ikki hava slíka góðkenning.

Innlendismálaráðið setti í 2005 eina kunngerð í gildi, har flutningur av persónsupplýsingum til øll ES-lond og tey londini, sum ES-nevndin hevur lýst sum trygg triðjalond, ikki krevur loyvi frá Dátueftirlitinum, men skal fráboðast Dátueftirlitinum. Føroyar hava á hendan hátt eins og ES góðkent øll ES lond og lond, sum ES hevur lýst sum sum trygg triðjalond.

## 5.1. TRIÐJALANDSGÓÐKENNING FRÁ ES NEVNDINI

Innlendismálaráðið søkti í 2005 ES-nevndina um at góðkenna Føroyar sum eitt trygt triðjaland í persónsupplýsingarhøpi. Síðani hevur verið arbeitt við málinum, og í 2010 komu boðini um, at ES-nevndin hevur góðkent Føroyar sum eitt trygt triðjaland.

Dátueftirlitið fegnast um ES góðkenningina, sum í høvuðsheitum merkir, at ES metir trygdarstøðið í Føroyum vera á jøvnum føti við trygdarstøðið í ES londum, tá tað snýr seg um viðgerð av persónsupplýsingum. Hetta merkir samstundis, at Føroyar sæð frá ES' síðu eru eitt land, sum verjir grundleggjandi demokratisk rættindi í einum nútímans talgildum samfelag.

Triðjalands góðkenningin hevur við sær, at Føroyar nú koma á listan yvir trygg triðjalond. Á listanum eru frammanundan umframt ES-londini eisini Ísland, Noreg og Sveits. Góðkenningin kemur at hava stóran týdning fyri føroyska samfelagið, og fer at gera tað lættari hjá føroyskum fyritøkum, herundir peningastovnunum, at samskifta við útheimin.

Góðkenningin fer somuleiðis at hava týdning fyri gransking og ætlanirnar at fáa útlendskar granskarar til Føroyar at granska, fyri møguleikan hjá føroyskum fyritøkum at marknaðarføra seg uttanlands og fyri ætlanirnar at bjóða Føroyar fram sum altjóða hosting miðdepil.

Avgerðin um at góðkenna Føroyar sum eitt trygt triðjaland kom í gildi tann 15. juni 2010.

## 5.2. NORÐURLOND

Virkið samstarv fer fram millum dátueftirlitini í Føroyum, Danmark, Íslandi, Noregi, Finnlandi og Svøríki. Hesi lond halda árliga samstarvsfundir bæði fyri málsviðgerum, leiðarum og teknikarum.

Dátueftirlitið hevur síðan 2005 luttikið á árligu málsviðgerafundunum millum norðurlendsku dátueftirlitini. Á hesum fundum eru framløgur um ymisk evni t.d. møguleikar við nýggjari tøkni, greitt verður frá týdningarmiklum málum í farna árinum, londini greiða frá ymiskum nýggjum trupulleikum, sum stinga seg upp og høvi er at fáa ymiskar spurningar á skrá til kjak.

Dátueftirlitið luttók í døgunum 26. til 28. mai 2010 á norðurlendskum málsviðgerafundi, Hetta er fundur, sum verður hildin á hvørjum ári, har umboð fyri Føroyar, Ísland, Noregi, Svøríki, Finland, Áland og Danmark luttaka at umrøða ymisk viðurskifti, sum hava felags áhuga. Í ár varð fundurin hildin í Reykjavík.

Á fundinum vóru m.a. hesi evni viðgjørd:

- Ein nýggj tænasta í Noregi: www.slettmeg.no
- Google Street View
- Ábyrgd av tilfari, sum lagt verður út á netið, særandi tilfar – hvat kunnu vit gera?
- Whistle blower
- Almennir myndugleikar og privatar fyritøkur nýta persónstalið.

Á fundinum varð avgjørt, at Danmark skal vera vertur fyri norðurlendska málsviðgerafundin í 2011.

Dátueftirlitið luttók á fyrsta sinni á fundi millum teknikarar frá norðurlendsku dátueftirlitunum. Fundurin varð hildin í Keypmannahavn í døgunum 15. til 16. september 2010. Á fundunum eru vanliga framløgur um ymisk evni t.d. møguleikar við nýggjari tøkni, greitt verður frá týdningarmiklum málum í farna árinum, londini greiða frá ymiskum nýggjum trupulleikum, sum stinga seg upp og høvi er at fáa ymiskar spurningar á skrá til kjak. Tað er serliga tað tøkniliga sjónarhornið, sum fundurin hevur á ymisku málini.

Á fundinum vóru m.a. hesi mál á skrá:

- Royndir frá eftirlitsvitjanum
- Cloud computing
- SIS og Schengen
- Google Street View
- SMS tænastur og áminningar
- Borgaraportalar
- Behavioural Advertising á netinum

Á fundinum varð avgjørt, at Noreg skal vera vertir fyri norðurlendska teknikarafundinum í 2011.

Dátueftirlitið metir, at tað hevur stóran týdning at luttaka á hesum fundum, og at vit kunnu læra nógv av londunum rundanum okkum. Londini hava havt løggávu á hesum økinum í longri tí enn vit hava í Føroyum, og tey kenna tí oftast teir trupulleikar vit stríðast við, og kunnu vísa á ymiskar loysnir, sum tey hava nýtt.

# 6 Eftirlit í 2010

Dátueftirlitið er ein eftirlitsmyndugleiki, sum skal tryggja, at persónsupplýsingarlógin verður hildin, og Dátueftirlitið hevur í hesum sambandi heimild til at gera kanningar á staðnum, og hevur til eina og hvørja tíð uttan dómsskurð, atgongd til øll høli, haðani persónsupplýsingar verða viðgjørdar ella goymdar, og til øll høli har persónsupplýsingarnar ella teknisk hjálparamboð verða goymd ella nýtt.

Dátueftirlitið kann harumframt m.a. áleggja einum dátuábyrgdara at fremja tøknilig og fyrisitingarlig trygdartiltøk, kann nokta einum dátuábyrgdara at nýta ávísan framferðarhátt og kann krevja, at dátuábyrgdari steðgar viðgerð, sum er brot á lógina.

Dátueftirlitið var í 2010 á eftirlitsvitjan hjá P/F Norðoya- /Vágatunlinum og í Kiosk Activ. Eftirlitið snúði seg serliga um trygdina í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum við vakmyndatóli.

## 6.1. EFTIRLIT HJÁ P/F VÁGATUNLINUM

Dátueftirlitið framdi fráboðað eftirlit tann 22. november 2010 hjá P/f Vágatunlinum, Skansavegur 7 í Tórshavn. Eftirlitið snúði seg serliga um at kanna trygdina fyri viðgerð av persónsupplýsingum í samband við vakmyndatól.

P/F Vágatunnilin hevur tvær vakmyndatólsskipanir. Onnur skipanin verður brúkt viðvíkjandi trygdini í tunlinum og hin skipanin er knýtt at gjaldskipanini.

**Vakmyndatólsskipan viðvíkjandi trygdini:**
Dátueftirlitið kundi staðfesta, at íalt 10 vakmyndatól verða brúkt í Vágatunlinum. Vakmyndatólini standa við tunnilsmunnarnar og inni í tunlinum. Greitt varð frá, at endamálið við vakmyndatólunum er at styrkja um trygdina í tunlinum. Vakmyndatólini gera tað møguligt at skráseta ferðsluvanlukkur, eld og møguligar aðrar vanlukkur. Vakmyndatólini fylgja norskum standardum.

Vakmyndatólini eru aktiv, tá ið rørslur eru. Tað slepst til upptøkurnar frá arbeiðsteldunum á skrivstovunum á Skansavegi. Bert… og… hava atgongd. Tekniskt sæð hevur eisini… møguleika at sleppa inn á upptøkurnar heimanífrá, men hetta verður ikki brúkt, tí at góðskan er so vánalig. Monitorar/skermar, sum vístu livemyndir, hingu uppi á vegginum inni á skrivstovuni, so fylgjast kundi við um okkurt var áfatt. Annars verður bara hugt at eldri upptøkum, um onkrar óvanligar hendingar eru.

Dátueftirlitið staðfesti á staðnum, at upptøkurnar verða goymdar í umleið 4-5 mánaðar og verða síðan yvirskrivaðar. Tað varð upplýst, at kervið er í tunlinum innilæst í tryggum teknikkhúsum úr betongi og í kontainara. Upplýst varð at skelting er uttan fyri tunnilsmunnarnar.

**Vakmyndatól viðvíkjandi gjaldskipanini:**
Dátueftirlitið kundi staðfesta, at 1 vakmyndatól verður brúkt í Vágatunlinum í.s.v. gjaldskipanina.

Vakmyndatólið verður brúkt til at krevja pening inn. Bert tey starvsfólk, sum arbeiða við inngjøldum, hava atgongd til hesa skipan. Í teim førum at rokning skal sendast, verður ein mynd tikin. Mynd verður bert tikin av nummarplátuni á bilinum. Myndirnar verða ikki strikaðar aftur. Upplýst varð, at P/F Vágatunnilin hevur fleiri rættarmál koyrandi, har fólk ikki hava goldið rokningina.

Á eftirlitsvitjanini varð upplýst, at P/F Vágatunnilin áður hevði fráboðað vakmyndatól, og hevði tá fingið upplýst frá Dátueftirlitinum, at tað var ikki neyðugt at fráboða hetta.

Tann 4. november 2002 hevur P/F Vágatunnilin sent Dátueftirlitinum bræv, har sagt verður frá, at í samband við dagliga raksturin av Vágatunlinum, verður gjalds- og eftirlitsstøð sett upp við tunnilsmunnan vestanfyri. Tann 21. november 2002 hevur Dátueftirlitið svarað, at fráboðanarskylda er ikki, tá talan er um viðgerð av persónsupplýsingum, sum ikki eru viðkvæmar.

Dátueftirlitið skal gera vart við, at tann 2. juli 2007 komu nýggjar reglur fyri vakmyndatól í gildi. Eftir nýggju reglunum skulu vakmyndatol fráboðast Dátueftirlitinum. Fráboðanin skal gerast á oyðublaði umvegis heimasíðuna www.datueftirlitid.fo

**Krøv, ið skulu verða lokin:**
Sbrt. § 2, stk. 3 í kunngerð nr. 31. frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, sum broytt við kunngerð nr. 71 frá 2. juli 2007, skulu vakmyndatólini fráboðast Dátueftirlitinum.

Dátueftirlitið skal hava fingið undirskrivaða fráboðan frá P/f Vágatunlinum um tey tilsamans 11 vakmyndatólini í báðum skipanunum skjótast, og í seinasta lagi tann 24. januar 2011.

Sambært vegleiðing frá Dátueftirlitinumum um vakmyndatól, skulu upptøkur goymast í mesta lagi í 14 dagar. Um P/F Vágatunnilin ikki kann lúka hesa treyt, verður biðið um haldgóða grundgeving fyri at víkja frá hesi meginreglu. Upplýsast skal eisini, hvussu leingi tað er neyðugt at goyma upptøkurnar.

Eftirlitið staðfesti, at tað var eingin synkronisering av tíðini, og at vakmyndatólini høvdu ymiskar klokkutíðir. P/F Vágatunnilin verður sum ábyrgdari av vakmyndatólsskipanini biðin um at tryggja, at dagfestingin og tíðarásetingin á upptøkunum er rótt. Hetta er sera týdningarmikið, um upptøkurnar verða brúktar sum prógv í málum, bæði viðv. gjaldskipanini og trygdarskipanini.

**Tilráðingar frá Dátueftirlitinum:**
Greiðar mannagongdir skulu vera fyri, hvør hyggur, og nær hyggjast skal eftir upptøkunum, og hvussu skal farast fram í samband við, at tær verða nýttar til eitthvørt lógarheimilað endamál.

Mælt verður til at tað altíð verður loggað av skipanini, tá farið verður frá telduni.

Mælt verður til at starvsfólkini fáa formliga kunning um vakmyndatólini og leiðbeining um ikki at fara inn á upptøkurnar, t.d. í eini starvsfólkahondbók.

Mælt verður til at loyniorðið skal vera 8 tekn, sum eru samansett av bæði stórum og smáum bókstavum og tølum. Loyniorðið skal broytast regluliga.

Eftirlitið gav annars ikki høvi til fleiri viðmerkingar, og metti Dátueftirlitið eftirlitið sostatt at vera liðugt.

## 6.2. EFTIRLITSVITJAN HJÁ KIOSK ACTIV

Dátueftirlitið framdi fráboðað eftirlit tann 22. november 2010 hjá Kiosk Activ í Jónas Broncksgøtu 44 í Tórshavn. Eftirlitið snúði seg serliga um at kanna trygdina fyri viðgerð av persónsupplýsingum í samband við vakmyndatól.

Eftirlitið varð framt, eftir at Dátueftirlitið hevði fingið fleiri navnloyndar fráboðanir frá fólki, sum ikki føldu seg trygg við vakmyndatólini hjá Kiosk Activ í Jónas Broncksgøtu.

Dátueftirlitið kundi staðfesta, at íalt 11 vakmyndatól vóru á staðnum. Vakmyndatólini standa ymsastaðni í handlinum og inni á goymsluni. Dátueftirlitið fór ígjøgnum øll vakmyndatólini á staðnum, og vórðu nøkur av vakmyndatólunum flutt nakað eftir tilráðing frá Dátueftirlitinum, soleiðis at vakmyndatólini vístu meira á vørur og minni á starvsfólk.

Greitt varð frá, at endamálið við vakmyndatólunum er at fyribyrgja og uppklára harðskap og stuldur. Endamálið er eisini, at vakmyndatólini skulu vera trygd hjá starvsfólki, serliga um náttina. Vakmyndatólini eru aktiv, tá ið rørslur eru. Tað slepst til upptøkurnar frá arbeiðsteldu á skrivstovuni í Kiosk Activ í Jónas Broncksgøtu. Harafturat kunnu eigararnir síggja upptøkur frá skrivstovuni, har bústaðurin hjá eigarunum eisini er.

Upplýst varð, at tað bert verður hugt at upptøkunum, um onkrar óvanligar hendingar eru, t.d. illgruni um stuldur ella harðskap. Upplýst varð, at felagið hevði gjørt skrivligar reglur um KT-trygd, sum Dátueftirlitið fekk útflýggjað á staðnum. Upplýst varð, at øll starvsfólk høvdu fingið munnliga kunning um vakmyndatólini, og at nýggj starvsfólk verða kunnað við setanarsamrøðu. Kundar verða kunnaðir við skelti á úthurðini.

Eigarin upplýsti, at upptøkurnar verða goymdar á eksternum harddiski á skrivstovuni í Jónas Broncksgøtu í 10.000 minuttir, svarandi til umleið 1 viku, og verða síðan yvirskrivaðar. Dátueftirlitið kundi tó ikki staðfesta, hvussu leingið upptøkurnar vóru goymdar, tí sleppast kundi ikki inn á upptøkurnar, ímeðan eftirlitið varð framt.

Upplýst varð, at rúmið, har kervið til vakmyndatólini stóð, var avlæst. Rúmið var bert opið tá eigarar ella leiðarar vóru til staðar. Atgongd til upptøkurnar hava eigararnir og leiðararnir av Kiosk Activ í Jónas Broncksgøtu og í Hornabø.

**Krøv, ið skulu verða lokin:**

Upplýst varð at fyrrverandi eigarin av Sp/f Kiosk Activ hevði boðað teimum frá, at vakmyndatólini vóru fráboðað Dátueftirlitinum. Dátueftirlitið hevur ikki fingið nakra fráboðan viðvíkjandi Kiosk Activ. Staðfestast kann tískil, at Sp/f E.S. sum dátuábyrgdari av vakmyndatólunum ikki hevur fráboðað Dátueftirlitinum vakmyndatólini, og verður eigarin biðin um at fráboða Dátueftirlitinum vakmyndatólini sum skjótast sbrt. § 2, stk. 3 í kunngerð nr. 31. frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, sum broytt við kunngerð nr. 71 frá 2. juli 2007.

Dátueftirlitið skal hava fingið undirskrivaða fráboðan frá Sp/f E.S. um tey 11 vakmyndatólini í seinasta lagi tann 24. januar 2011. Fráboðanin skal gerast á oyðubladi umvegis heimasíðuna www.datueftirlitid.fo. Í fráboðanini skal m.a. eisini greiðast frá, hví eigararnir hava mett tað vera neyðugt at hava atgongd til upptøkurnar á skrivstovuni heimanifrá.

Skeltir um nýtslu av vakmyndatólum skulu vera á øllum inngongdum.

**Tilráðingar frá Dátueftirlitinum:**

Greiðar mannagongdir skulu vera fyri, hvør kann hyggja, og nær hyggjast skal eftir upptøkunum, og hvussu skal farast fram í samband við, at tær verða nýttar til eitthvørt lógarheimilað endamál.

Mælt verður til at tað altíð verður loggað av skipanini, tá farið verður frá telduni.

Mælt verður til at starvsfólkini fáa formliga kunning um vakmyndatólini og leiðbeining um ikki at fara inn á upptøkurnar, t.d. í eini starvsfólkahondbók.

Mælt verður til at loyniorðið skal vera 8 tekn, sum eru samansett av bæði stórum og smáum bókstavum og tølum. Loyniorðið skal broytast regluliga.

Mælt verður til at tryggja, at dagfestingin og tíðarásetingin á upptøkunum er røtt.

Eftirlitið gav annars ikki høvi til fleiri viðmerkingar, og metti Dátueftirlitið eftirlitið sostatt at vera liðugt.



010101010101

ANNIJANNI

Dátueftirlitið

Dátueftirlitið verjr tínar persónsupplýsingar

www.datueftirlitid.fo